# EIN FELAGS HURÐ

## *- Endurskoðan av tilboðum og skipanum til børn, ung og familjur við serligum tørvi*



**Álit handað landsstýriskvinnuni á Grækarismessu 2010**

# Innihald


**1. Inngangur 5**

1.1. Arbeiðsbólkurin 5

1.2. Arbeiðssetningur hjá arbeiðsbólkinum 5

1.3. Viðmerkingar 6

1.4. Avmarkingar 6

1.5. Ummæli 6

1.6. Hagtøl 7

**2. Børn og ung 7**

**3. Serligur tørvur 7**

3.1. Børn og ung við breki 8

3.2. Børn og ung - barnavernd 8

**4. Tilboð og skipanir í dag 8**

4.1. Útgreining 9

4.1.1. Børn og ung 9

4.1.2. Familjur 11

4.2. Tilboð og skipanir eftir forsorgarlógini 11

4.2.1. Dagstovnurin Reiðrið 11

4.2.2. Familjudepilin – ráðgeving í sambandi við førleikatarn 12

4.2.3. Stuðulsfólkaskipanin fyri børn (SFB) 12

4.2.4. Heimið sum stovnur 14

4.2.5. Umlætting 14

4.2.6. Samdøgursstovnur eftir § 16, stk. 1 í forsorgarlógini til børn, ið bera brek 15

4.3. Tilboð og skipanir eftir barnaverndarlógini 16

4.3.1. Fyribyrgjandi fyriskipanir 17

4.3.2. Samdøgursstovnur fyri børn og ung 18

4.3.3. Stovnslíknandi fyriskipan 19
4.3.4. Ungdómsdeildin á Føroya Barnaheimi 19
4.3.5. Serdagstovnur 20
4.3.6. Familjudepilin 20
4.3.7. Fosturforeldur 21
4.3.8. Samdøgursstovn uttanlands 22
4.3.9. Umlætting 23
4.4. Sjónveik 23
4.4.1. Sernámsdepilin 23
4.4.2. Sjóndepilin 23
4.5. Teknmál 24
4.5.1. Teknmálstulkatænastan 24
4.5.2. Teknmálslæra 24
**5. Bygnaðurin 24**
5.1. Bygnaðurin fram til 2009 25
5.2. Bygnaðurin í 2009 25
**6. Fyrimunir og vansar við galdandi skipan 26**
6.1. Barnaverndarøkini 26
6.2. Fyribyrgjandi fyriskipanir 26
6.3. Útgreining 26
6.4. Økið "Børn og Ung" 27
6.5. Stuðulsfólkaskipanin fyri Børn 28
6.6. Samdøgurstilboð 28
6.7. Fosturforeldraskipanin 29
6.8. Samdøgurstilboð uttanlands 29
6.9. Samstarv, tá mál eru fevnd av bæði forsorgarlógini og barnaverndarlógini 30
6.10. Vantandi samskipan 30

**7. Gráøkis- og markamótstrupulleikar 30**

7.1. Millum myndugleikar 31

7.1.1. Millum kommunur og landið 31

7.1.2. Millum Almannamálaráðið og Mentamálaráðið 32

7.1.3. Millum Almannamálaráðið og Heilsumálaráðið 33

7.2. Millum lógir undir Almannamálaráðnum 34

7.3. Loysnir 35

**8. Tilboð og skipanir í framtíðini 36**

8.1. Útgreining og uppfylgjandi viðgerð 37

8.2. Tilboð og skipanir kring landið 37

8.3. Stuðulsfólkaskipanin fyri børn (SFB) 37

8.4. Fosturforeldraskipanin 38

8.5. Samdøgurstilboð 38

8.5.1. Ungdómsdeild 39

8.5.2. Viðgerðardeild við tveimum eindum 39

8.5.3. Sosialpsykiatrisk eind 39

8.5.4. Verkætlanareind 40

8.5.5. Bráðfeingispláss 40

8.5.6. Útslúsing 40

8.5.7. Familjudeild 40

8.6. Umlætting 41

8.6.1. Bú- og umlættingartilboð til børn og ung við autismu 41

8.6.2. Bú- og umlættingartilboð til børn við fjølbreki 42

8.7. Búpláss til børn við serligum tørvi 43

8.7.1. Útslúsingar-, bú- og arbeiðsavkláringartilboð 44

8.8. Ráðgeving til familjur at børnum við serligum tørvi 44

8.9. Stovnsuppihald uttanlands 44

8.10. Visitatión 44

**9. Hvussu skipa vit tilboð og skipanir í framtíðini 45**

9.1. Brek- og barnavernd í einum felags høpi 45

9.2. Eitt stað at venda sær til 45

9.3. Ráðgeving og vegleiðing 46

9.4. Kommunalu økini 47

9.5. Útgreining 47

9.6. Fosturforeldraskipanin 48

9.7. Samdøgurstilboðini 49

9.8. Samdøgursstovn uttanlands 50

9.9. Dag- og umlættingartoymi 51

9.10. Dag- og umlættingarstovnar 51

9.11. Stuðulsfólkaskipanin fyri børn (SFB) 51

9.12. Búpláss til børn og ung undir 18 ár 51

9.13. Fyrisitingin av fosturforeldraskipanini, samdøgurstilboðunum og SFB. 51

**10. Útlegging til kommunurnar – fyrimunir og vansar 52**

10.1. Niðurstøða 53

**11. Eftirlit 54**

**12. Visitatión til tilboð og skipanir 54**

**13. Fíggjarligt 54**

**14. Tilmæli 57**

**15. Lógarbroytingar og onnur verkseting 58**

**Skjal 1: Bygnaður 2006 til 2009 60**

**Skjal 2: Bygnaður í 2009 61**

**Skjal 3: Bygnaður síðan september 2009 62**

**Skjal 4: Yvirlit yvir tilboð og skipanir umframt ábyrgdarbýtið 63**

**Skjal 5: Framtíðar bygnaður 64**

# 1. Inngangur

Eitt av aðalmálunum hjá landsstýriskvinnuni í almannamálum er at skapa umstøður fyri, at øll børn, ung og familjur við serligum tørvi í mest møguligan mun fáa nøktandi tilboð í Føroyum.

Til tess at røkka hesum máli, setti landsstýriskvinnan í mai 2009 ein arbeiðsbólk at leggja fram álit um, hvussu tilboð og skipanir til børn, ung og familjur við serligum tørvi, eftir forsorgarlógini og barnaverndarlógini, kunnu skipast á mest skynsama hátt, soleiðis at øll børn, ung og familjur við serligum tørvi fáa nøktandi tilboð í Føroyum. Arbeiðsbólkurin fekk í fyrstu atløgu álagt at leggja álitið fram í seinasta lagi í desember 2009. Handanin varð tó seinni útsett til miðjan mars 2010.

Arbeiðsbólkurin er nú liðugur við sítt arbeiði, og er komin fram til tær niðurstøður, ið eru í hesum áliti.

## 1.1. Arbeiðsbólkurin

Arbeiðsbólkurin hevur verið mannaður soleiðis:

Umboðandi Barnaverndarstovu Føroya: Oddbjørg Balle, leiðari.
Umboðandi barnaverndartænasturnar: Eyðun Jensen, leiðari á Barnaverndartænastuni í Havn, Jákup Foldbo, leiðari á Eysturoyar Barnaverndartænastu og Hans Andreas Dam Joensen, leiðari á Barnaverndartænastuni í Sundalagnum.
Umboðandi Nærverkið: Minna Poulsen, leiðari á Børn og Ung, Súsanna Holm, leiðari á Stuðulsfólkaskipanini fyri børn.
Umboðandi Almannastovuna: Birita Viderø, fulltrúi.
Umboðandi Almannamálaráðið: Tórhild Højgaard, fulltrúi, ið samstundis er samskipari hjá arbeiðsbólkinum.

## 1.2. Arbeiðssetningur hjá arbeiðsbólkinum

Arbeitt hevur verið út frá hesum arbeiðssetningum:

1. At lýsa núverandi skipan viðvíkjandi tilboðum til børn/ung og familjur við serligum tørvi eftir forsorgarlógini og barnaverndarlógini, umframt at fyrimunir og vansar við galdandi skipan verða nágreinaðir. Her verður hugsað um dagtilboð, samdøgurstilboð, herundir fosturforeldraskipanin, umlættingartilboð, tilboð um stuðul, ráðgeving, viðgerðartilboð o.a.

2. At lýsa gráøkis- og markamótstrupulleikar millum ymisk øki, og at koma við tilmæli um, hvørji tilboð hoyra undir almannaøkið.

3. At lýsa gráøkis- og markamótstrupulleikar millum forsorgarlógina og barnaverndarlógina, og at koma við tilmæli um, hvussu trupulleikarnir kunna loysast.

4. At koma við tilmæli um, hvørji tilboð og skipanir eiga at verða bjóðað í Føroyum til børn/ung og familjur við serligum tørvi eftir forsorgarlógini og barnaverndarlógini.

5. At koma við tilmæli um, hvussu tilboð og skipanir til børn/ung og familjur við serligum tørvi kunnu skipast, soleiðis at hesi tilboð og skipanir eru smidligar og kunnu nøkta skiftandi tørv, samstundis sum mest gagn fæst burturúr fakfólki við serkunnleika, eitt nú sálarfrøðingum. Her skal vera hugsað um, at tað eru tvær lóggávur, ið regulera tilboð og skipanir til børn/ung og familjur við serligum tørvi.

6. At lýsa møguligar fyrimunir og vansar við at leggja økið út til kommunurnar, møguliga undir ein felagskommunalan myndugleika.

7. At lýsa fyrimunir og vansar við verandi visiteringsskipan til tilboð og skipanir, umframt at koma við tilmæli um hvussu visitering til tilboð og skipanir skal skipast, eisini sæð í mun til lóggávu.

### 1.3. Viðmerkingar

Í 2009 eru bygnaðarbroytingar framdar á økinum "Børn og Ung". Arbeiðið við at fremja bygnaðarbroytingarnar byrjaði stutt áðrenn arbeiðsbólkurin bleiv settur, og nýggja skipanin er enn ikki komin at virka til fulnar, soleiðis at skilja, at Barnaverdartænasturnar enn ikki eru greiðar yvir, hvørji tilboð eru tøk. Tískil er torført hjá arbeiðsbólkinum at endurskoða tey tilboð og tær skipanir, sum bygnaðarbroytingarnar føra við sær.

Arbeiðsbólkurin hevur tó valt at leggja til grund tey tilboð og tær skipanir, sum væntandi verða, tá bygnaðarbroytingarnar eru framdar, og at koma við viðmerkingum um bygnaðarbroytingarnar, har hetta er viðkomandi.

### 1.4. Avmarkingar

Arbeiðsbólkurin er settur av landsstýriskvinnuni í almannamálum og hevur tískil bert endurskoðað tilboð og skipanir, sum eru fevnd av málsøkinum hjá Almannamálaráðnum. Sostatt hevur arbeiðsbólkurin ikki endurskoðað tilboð og skipanir fevnd av málsøkinum hjá øðrum aðalráðum. Tó loyvir arbeiðsbólkurin sær at koma við viðmerkingum til skipanir, sum hava beinleiðis ávirkan á tilboð og skipanir, sum eru fevnd av málsøkinum hjá Almannamálaráðnum.

Arbeiðsbólkurin hevur ikki endurskoðað tær fyribyrgjandi fyriskipanirnar innan barnavernd, sum kommunurnar varða av, men loyvir sær tó at gera ymiskar viðmerkingar hesum viðvíkjandi.

### 1.5. Ummæli

Sum ein liður í at lýsa verandi tilboð og skipanir, her í millum hvørjir trupulleikar og manglar eru, hevur arbeiðsbólkurin heitt á Meginfelag Teirra Brekaðu í Føroyum, Fosturforeldrafelagið, Fosturforeldraskipanina, Høvuðsbarnaverndarnevndina, Almannastovuna, Nærverkið, umframt Kommunusamskipan Føroya og Føroya Kommunufelag, her

í millum barnaverndartænasturnar, um at koma við viðmerkingum til m.a., um verandi tilboð og skipanir eru nøktandi.

Harafturat er Sernámsdepilin, Psykiatriski depilin á Landssjúkrahúsinum, og sálarfrøðingurin hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini biðin um at koma við tilmæli um, hvørji børn og ung kunnu vera á sama stovni.

Álitið í síni heild hevur verið til ummælis hjá Mentamálaráðnum, Heilsumálaráðnum, Sernámsdeplinum, Psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum, Gigni, Meginfelag teirra Brekaðu, Dugna, Fosturforeldrafelagnum, Almannastovuni, Nærverkinum, Stýrinum fyri Føroya Barnaheimi, Høvuðsbarnaverndarnevndini, Føroya Kommunufelagi, Kommunusamskipan Føroya og Føroya Pedagogfelagi.

Tær viðmerkingarnar, sum arbeiðsbólkurin hevur móttikið, eru í ávísan mun tiknar við í álitið.

### 1.6. Hagtøl

Arbeiðsbólkurin hevur útvegað sær hagtøl frá Høvuðsbarnaverndarnevndini, Almannastovuni, Nærverkinum og Barnaverndarstovu Føroya, her í millum barnaverndartænastunum og Fosturforeldraskipanini, viðvíkjandi økinum Børn og Ung. Tey innkomnu hagtølini eru tikin við í álitið.

## 2. Børn og ung

Tá tosað verður um børn, ung og familjur, verður hugsað um børn og ung í aldrinum 0 til 18 ár og familjur teirra. Tó eru ávísar fyriskipanir, har hugsað verður um ung upp til 21 ár, og kemur hetta beinleiðis til sjóndar í álitinum.

## 3. Serligur tørvur

Tá tosað verður um serligan tørv, verður hugsað um børn og ung, sum hava eitthvørt brek, tað verði seg likamligt ella sálarligt, ella varandi víðfevnda sjúku, sum ger, at tey hava ein serligan tørv, sum sokallaði “normal” børn og ung ikki hava. Eisini verður hugsað um børn og ung, sum liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, og sum tískil hava tørv á serligum stuðli og umsorgan.

Tey børn og ungu, sum hava eitthvørt brek, ella varandi víðfevnda sjúku, eru fevnd av forsorgarlógini, meðan børn og ung, sum liva undir viðurskiftum, ið kunna skaða teirra heilsu og menning, eru fevnd av barnaverndarlógini. Børn og ung við serligum tørvi kunnu tó vera fevnd av báðum lóggávum.

Tað er sera ymiskt, hvønn tørv børn, ung og familjur teirra hava. Børn og ung fevnd av forsorgarlógini og børn og ung fevnd av barnaverndarlógini kunnu tó hava sama tørv.

### 3.1. Børn og ung við breki

Børn og ung við breki kunnu bólkast upp í hesar høvuðsbólkar:

- Fjølbrekað
- Likamliga brekað
- Menningartarnað
- Sálarsjúk, ADHD, ADD
- Autisma
- Blind
- Deyv

### 3.2. Børn og ung - barnavernd

Børn og ung, sum eru fevnd av barnaverndarlógini, hava oftast hesar høvuðstrupulleikar:

- Kensluligar trupulleikar
- Sosialar trupulleikar
- Ikki aldurssvarandi ment
- Sálarsjúk/ADHD/ADD
- Atferðar- og tillagingartrupulleikar
- Tilknýtistrupulleikar
- Rúsevnismisnýtslu

## 4. Tilboð og skipanir í dag

Verandi tilboð og skipanir hava í stóran mun heimild í annaðhvørt forsorgarlógini ella barnaverndarlógini. Tó eru tilboð og skipanir, sum hava heimild í aðrari lóggávu.

Tað, sum er avgerandi fyri, hvørji tilboð og skipanir møguleiki er fyri at bjóða børnum, ungum og familjum teirra er, hvørjari lóggávu tey eru fevnd av. Børn og ung, sum eru fevnd av barnaverndarlógini, og familjur teirra, kunnu fáa bjóðað tilboð, sum hava heimild í barnaverndarlógini, meðan tey, sum eru fevnd av forsorgarlógini, kunnu fáa bjóðað tilboð, sum hava heimild í forsorgarlógini. Børn og ung, sum eru fevnd av forsorgarlógini, kunnu tó innskrivast á samdøgursstovn, sum hevur heimild í barnaverndarlógini, um pláss er á stovninum og viðkomandi fakliga kann sameinast við málbólkin hjá stovninum. Børn og ung fevnd av báðum lóggávunum kunnu fáa bjóða tilboð eftir báðum lógunum.

Viðmerkjast skal, at tá sipað verður til samdøgursstovn, er talan um stovn til fyribils uppihald í styttri ella longri tíð, og ikki fast búpláss. Bert ein stovnur við varandi búplássum til børn og ung er í Føroyum[1].

[1] 1. apríl 2010 letur bústovnur til børn og ung við autismu væntandi upp í Klaksvík, við 7 búplássum og 2. umlættingarplássum. Tey sum flyta inn í búplássini eru í aldrinum 8 – 17 ár. Ætlanin er, at hesi framhaldandi skula búgva her, eisini eftir at tey eru vorðin 18 ár.

Umlætting er at skilja sum fyribils uppihald í styttri tíð, vanliga 2-3 dagar hvørja ferð. Tó komu eisini longri umlættingar fyri, tá serliga umstøður tala fyri tí.

Tey ymisku tilboðini og skipanirnar verða nærri lýst niðanfyri.

## 4.1. Útgreining

Útgreining vil siga, at mett verður um førleika og tørv hjá tí einstaka.

Hóast útgreining av børnum og ungum ikki er ein partur av ábyrgdarøkinum hjá Almannamálaráðnum, er útgreining tikin við, tí hendan er ein fortreyt fyri, at børn, ung og familjur við serligum tørvi fáa rætta tilboðið.

Áðrenn støða verður tikin til, hvat tilboð ella hvør fyriskipan er tann rætta fyri tað einstaka barnið ella unga, er tað umráðandi, at mett verður um teirra førleika og veruliga tørv, soleiðis at finnast kann fram til, hvat tilboð ella hvør fyriskipan er tann rætta fyri viðkomandi. Tað sama er galdandi, tá talan er um at seta eina fyriskipan í verk fyri eina familju.

Manglandi útgreining kann hava við sær, at tann fyriskipan, sum verður sett í verk, antin ikki er røtt og at tað tískil eftir eina tíð verður neyðugt at seta nýggja fyriskipan í verk, t.d. flyta eitt barn frá eini fosturfamilju til ein stovn. Eisini kann vantandi útgreining hava við sær, at fyriskipanin ikki er nóg umfatandi, ella at ov nógv verður sett inn, eitt nú við stuðli. Um ov nógv verður sett inn við stuðli, hevur tað oftani ónøgd og ótryggleika við sær, um skorið verður av stuðulstímunum.

At skeiv fyriskipan verður sett í verk, hevur bæði menniskjaligar og fíggjarligar avleiðingar. Fyri eitt barn kann skeiv fyriskipan hava við sær, at barnið verður enn verri fyri enn tað var, áðrenn fyriskipanin bleiv sett í verk, ella at barnið ikki mennist. Fíggjarligu fylgjurnar eru, at útreiðslur eru hildnar fyri eina fyriskipan, sum í besta føri ikki hevur havt nakra jaliga ávirkan fyri barnið ella tann unga.

### 4.1.1. Børn og ung

Í dag verða børn og ung útgreinað á Sernámsdeplinum (SND), sum Mentamálaráðið varðar av, á Psykiatriska deplinum og á Barnadeildini á Landssjúkrahúsinum, sum Heilsumálaráðið varðar av.

Sambært teksti í fíggjarlógini[2] fatar arbeiðið hjá Sernámsdeplinum um, at:

- *skipa fyri og ráðgeva í øllum sernámsfrøðiligum spurningum,*
- *ráðgeva í sambandi við undirvísing,*
- *kanna og veita venjing, viðgerð, stuðul og vegleiðing, soleiðis at børn og vaksin eftir førimuni fáa høvi til at mennast á øllum økjum.*

[2] Uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri fíggjarárið 2010.

*Stuðulin verður veittur børnum og ungfólki undir 18 ár, bæði í heimi, dagstovni, dagrøkt, heimliga skúlanum, øðrum skúla ella stovni ella í Sernámsdeplinum. Umframt hetta kann ráðgeving verða veitt foreldrum, fakfólkum og øðrum, ið varða av hesum børnum.*

Útgreiningin er í dag í høvuðsheitinum skipað soleiðis, at foreldur, skúlar, dagstovnar ella heilsufrøðingar venda sær til SND tá tað gerst klárt, at eitt barn ella ein ungur hevur serligan tørv[3]. Á tilmeldingarblaðnum fær SND upplýsingar um barnið ella tann unga, eitt nú hvørjir trupulleikarnir eru. Um neyðugt eygleiðir SND barnið ella tann unga[4]. Tá SND hevur fingið nøktandi upplýsingar, gera tey eina meting av førleikanum og tørvinum hjá barninum ella tí unga. Um sálarfrøðingur hjá SND metir, at talan kann verða um psykiatriskar trupulleikar, vísa tey viðkomandi til Psykiatriska depilin, sum síðani ger eina meting av barninum ella tí unga. Børn og ung kunnu tó eisini blíva víst til Psykiatriska depilin av egnum lækna, uttan fyrst at hava verið á SND.

SND útgreinar børn og ung sum heild bert við atliti at skúla- og dagstovnatilboðum. Útgreiningin tekur soleiðis ikki fyrilit fyri, hvønn annan tørv barnið ella tann ungi hevur, ella hvør fyriskipan eitt nú eigur at verða sett í verk uttanfyri skúlan ella dagtilboðið. Ongin heildarætlan verður gjørd fyri barnið ella tann unga.

Barnadeildin hevur ein týðandi leiklut, tá talan um børn og ung við breki, bæði tá talan er um sjúkuavgerð og sjúkraviðgerð.

Psykiatriski depilin tekur í sínari útgreining í stóran mun bert støðu til, hvørt barnið ella tann ungi hevur eina sálarsjúku ella ikki, t.e. staðfestir eina sjúkuavgerð, um ein slík er. Tað verður heldur ikki her gjørd nøkur heildarætlan fyri barnið ella tann unga.

Sambært teimum upplýsingum, sum barnaverndartænasturnar dag og dagliga fáa frá skúlunum, er oftani upp til eitt ára bíðitíð til at fáa útgreinað børn og ung, bæði á SND og Psykiatriska deplinum. Hetta er sera óheppið og hevur við sær, at fyriskipan verður sett í verk fyri barnið ella tann unga, sum tað við tíðini vísir seg ikki kann nøkta tørvin hjá viðkomandi. Orsøkin er, at tað ikki er ráðiligt at bíða við at seta eina fyriskipan í verk, til barnið ella tann ungi kann verða útgreinaður á SND og/ella á Psykiatriska deplinum.

Orsakað av longu bíðitíðini fáa barnaverndartænasturnar í ávísum førum børn og ung útgreinað hjá privatpraktiserandi sálarfrøðingum.

Viðmerkjast skal tó, at tað er eitt gott samstarv millum eitt nú barnaverndartænasturnar/Børn og ung/Stuðulsskipanina fyri børn og SND/Psykiatriska depilin, og at hetta samstarvið í ávísum málum hevur haft við sær, at ein heildarætlan er gjørd fyri barnið ella tann unga.

[3] SND tekur bert málið upp, um foreldur geva skrivligt samtykki.
[4] Vanliga verða bert børn undir skúlaaldur eygleidd inni á SND.

### 4.1.2. Familjur

Í sambandi við bygnaðarbroytingarnar innan økið "Børn og Ung", hevur Familjudepilin yvirtikið virksemið hjá Familjudeildini á Føroya Barnaheimi[5].

Ein av tænastunum, sum ætlandi skal halda fram á Familjudeplinum, er at bjóða eygleiðing av familjum, her í millum í sambandi við meting av foreldraførleika. Ein foreldraførleikakanning er gagnlig í sambandi við, at metast skal um, hvørt eitt barn ella ein ungur skal verða settur heiman, ella um tað er nøktandi at seta eina fyriskipan í verk í heiminum.

Eygleiðing kann fara fram antin á Familjudeplinum ella heima hjá familjuni. Um neyðugt, kunnu familjur innskrivast á Familjudepilin til samdøgurstilboð, men roynt verður í mest møguligan mun at fremja eygleiðingina um dagin, t.v.s. sum dagtilboð.

Barnaverndartænasturnar hava sum heild verið nøgdar við Familjudeildina (áðrenn bygnaðarbroytingarnar), men saknaðu tó, eins og Høvuðsbarnaverndarnevndin, at sálarfrøðiligar kanningar vórðu gjørdar á deildini.

Hesar atfinningar eru tiknar til eftirtektar í sambandi við bygnaðarbroytingarnar. Familjudepilin hevur í løtuni tveir sálarfrøðingar í starvi. Annar av sálarfrøðingunum hevur royndir við foreldraførleikakanningum.

## 4.2. Tilboð og skipanir eftir forsorgarlógini

Forsorgarlógin hevur í dag hesi tilboð og skipanir:

- Dagstovnurin Reiðrið
- Familjudepilin – ráðgeving og viðgerð
- Stuðulsfólkaskipanin fyri børn
- Heimið sum stovnur
- Umlætting
- Samdøgursstovnur eftir § 16, stk. 1 í forsorgarlógini

### 4.2.1. Dagstovnurin Reiðrið

Reiðrið er ein landsumfatandi dagstovnur til børn og ung við fjølbreki í aldrinum 0 – 18 ár. Harafturat er møguleiki fyri umlætting. Stovnurin hevur 8 dagstovnapláss og 3 umlættingarpláss. Hesi pláss hava verið nýtt til fulnar, síðan stovnurin lat upp í 2006.

Endamálið hjá stovninum er at geva børnunum ein innihaldsríkan gerandisdag við teimum tilboðum, tey hava tørv á. Virksemið fevnir um, at arbeitt verður við at økja um samskiftið hjá børnunum, likamliga venjing, røkt, sansastimbran, spæl o.a. Stórur dentur verður lagdur á, at hava fyrilit fyri menningini og aldrinum hjá tí einstaka barninum, sambandi og tilknýti, at menna samskiftið, at menna sjálvsvirðið, tryggleika, umsorgan, at fáa børnini við í dagliga arbeiðið á stovninum og gott foreldrasamstarv.

[5] Sí pkt. 4.3.5. um Familjudepilin

Hølisviðurskiftini hjá stovninum í løtuni eru ikki nøktandi. Stovnurin húsast í einum vanligum sethúsum í Rókini (í Saltnesi), ið ikki eru bygd til endamálið, og sum ikki hava nøktandi atkomuviðurskifti. Viðmerkjast skal, at Almannamálaráðið er byrjað fyrireikingararbeiðið í sambandi við ætlan um at byggja nýggjan stovn til fjølbrekað børn[6], sum ætlandi skal verða liðugur í 2011.

### 4.2.2. Familjudepilin – ráðgeving í sambandi við førleikatarn

Familjudepilin, ið hevur yvirtikið virksemið hjá Familjuhúsinum, hevur ymisk tilboð til børn, ung og familjur, bæði eftir forsorgarlógini og barnaverndarlógini. Familjudepilin[7] heldur til á Føroya Barnaheimi.

Á Familjudeplinum kunnu familjur við barni/unglinga, ið hevur brek ella varandi víðfevnda sjúku, fáa ráðgeving – familjuráðgeving til familjuna og fakliga ráðgeving í mun til brekið. Í ávísan mun verður eisini veitt sálarfrøðilig viðgerð. Endamálið er at hjálpa familjuni at síggja og fyrihalda seg til serliga tørvin hjá barninum, og at liva við honum, til gagns fyri bæði barnið við førleikatarni og onnur børn og vaksin í familjuni. Harumframt verða barnið og familjan stuðlað í einari framhaldandi menningargongd. Familjan fær bjóðað samrøður við sálarfrøðing, familjuviðgera ella annað fakfólk, sum hevur innlit í serligu støðuna hjá familjuni og barninum.

Virksemið til ambulanta ráðgeving er tengt at, hvussu nógv børn eru innskrivað á Serdagstovninum – sí **4.3.3.** niðanfyri.

### 4.2.3. Stuðulsfólkaskipanin fyri børn (SFB)

Stuðulsfólkaskipanin fyri børn (SFB) veitir stuðul til heimabúgvandi børn undir 18 ár, sum tørva stuðul vegna virkistarn, orsakað av likamligum ella sálarligum breki ella víðfevndari sjúku.

SFB virkar í 10 stuðulstoymum kring landið, umframt heima hjá børnum, ið bera brek, og heima hjá stuðulsfólkum. Skipanin veitir hesi stuðulstilboð:

- Sernámsfrøðilig dagtilboð og frítíðartilboð eftir skúlatíð til børn, ið ikki eru fevnd av kommunalum tilboðum
- Fylgjarauppgávur, t.v.s. stuðulsfólk fylgja børnum og ungum til viðgerðir, frítíðar-virksemi o.a.
- Ansing og røkt í heiminum
- Náttarvakt til fjølbrekað børn og ung[8]
- Umlætting til børn og ung, ið ikki fáa umlættingartilboð frá serstovnum undir Nærverkinum. Sí **4.2.5.**

---

[6] Ætlanin er, at stovnurin umframt dagtilboð, herundir venjing v.m., eisini skal hava búpláss og pláss til umlætting.

[7] Sí eisini pkt. 4.3.5. um Familjudepilin.

[8] Náttarvakt verður veitt til fjølbrekað børn og ung, antin tí at hesi liggja í andingartóli (heilsulig náttarvakt), ella fyri at foreldrini kunnu sova og sleppa til arbeiðis (sosial náttarvakt).

Endamálið er at veita børnum og ungum við serligum tørvi stuðulstilboð, ið verða løgd til rættis við støði í tørvinum hjá tí einstaka. Harumframt er endamálið at lætta um hjá familjuni, soleiðis at familjan kann virka, og børnini og tey ungu við serligum tørvi kunnu búgva heima longst møguligt.

Víst verður á, at dag- og frítíðartilboðini eru nógv batnaði seinastu árini. Serliga eru foreldur glað fyri, at hesi tilboð verða skipað í stuðulstoymum, har børn og ung verða savnað á einum stað[9]. Eisini eru foreldur glað fyri, at stuðlarnir fylgja børnum m.a. til ymsar viðgerðir og frítíðarvirksemi. Omanfyri standandi er avgerandi fyri, at foreldrini kunnu hava tilknýti til arbeiðsmarknaðin. Hagtøl vísa, at virksemið hjá SFB er økt frá 82 brúkarum í 2006 til 112 brúkarar í 2009. Talvan niðanfyri vísir tal av brúkarum býttir eftir aldri:




| | Ár 2006 | Ár 2007 | Ár 2008 | Ár 2009 |
|---|---|---|---|---|
| 14 - 17 ár | 20 | 24 | 22 | 31 |
| 7 - 13 ár | 52 | 61 | 63 | 70 |
| 0 - 6 ár | 10 | 11 | 14 | 11 |

Sum talvan niðanfyri vísir, er virksemið innan flestu fyriskipanirnar hjá SFB samstundis økt[10]:




| | Umlætti ng | Menning artilboð | Fylgjari | Koyring | Náttarva kt | Røkt | Stuðul í skúlatíð | Venjing | Hjálp til skúlatin |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Ár 2006 | 34 | 62 | 17 | 53 | 8 | 25 | 13 | 38 | 3 |
| Ár 2007 | 42 | 66 | 16 | 53 | 9 | 28 | | 40 | 4 |
| Ár 2008 | 43 | 68 | 16 | 58 | 8 | 30 | | 43 | 6 |
| Ár 2009 | 49 | 78 | 21 | 61 | 9 | 29 | | 40 | 3 |

Viðmerkjast skal, at sami brúkari kann hava fleiri veitingar frá SFB. Harafturat skal sigast, at skúlaverkið frá 2007 hevur veitt stuðlar í skúlatíð, í samsvari við sektorábyrgdina[11]. Brúkarnir hjá SFB, kunnu býtast á brek soleiðis:

---

[9] Tað er ikki allastaðni hetta ber til. Har, ið ikki ber til at samla nóg nógv børn og ung til eitt toymi, er neyðugt at seta inn við stuðli ein til ein.

[10] Ansing skal skiljast sum ansing av børnum í heiminum ella børn, sum eru í toymi.




| | Fjølbrekað | Fysiskt brek | Menningar tarn | Autisma/ADHD o.l. | Annað |
|---|---|---|---|---|---|
| Ár 2006 | 23 | 10 | 26 | 16 | 7 |
| ár 2007 | 26 | 12 | 26 | 25 | 7 |
| ár 2008 | 25 | 12 | 23 | 31 | 8 |
| ár 2009 | 24 | 9 | 26 | 41 | 12 |

### 4.2.4. Heimið sum stovnur

Fjølbrekað børn og ung hava oftast tørv á serligari røkt alt samdøgrið. Tískil hava hesi tørv á nógvum stuðli. Í ávísum førum veitir SFB náttarvaktir, námsfrøðiligt frítíðartilboð, vikuskiftisumlætting 1-2 vikuskifti um mánaðin og leysar tímar til børn og ung við fjølbreki, sum hava størsta tørvin. Ásannast má tískil, at stuðul frá SFB er um barnið ella tann unga størsta partin av samdøgrinum, og at talan í roynd og veru er um ein stovn inni í egnum heimi.

### 4.2.5. Umlætting

Møguligt er hjá familjum at søkja um umlætting, antin á einum umlættingarstovni ella frá SFB.

Nærverkið[12] hevur tríggjar umlættingarstovnar, Dáan, Frítíðarheimið[13] og Kelduskákið[14], ið veita umlætting til børn og ung umframt vaksin[15]. Dáin og Frítíðarheimið veita umlætting til øll uttan børn við autismu, meðan Kelduskákið bert veitir umlætting til børn við autismu.

SFB skipar umlætting bæði í heiminum hjá barninum, hjá stuðulsfólki, í Reiðrinum og á stuðulsstovni hjá SFB í Tórshavn[16].

Skipanin er soleiðis, at foreldur fyrst skulu søkja Nærverkið um umlætting á einum umlættingarstovni. Kann Nærverkið ikki bjóða umlætting, orsakað av at einki pláss er tøkt, skulu foreldur søkja Almannastovuna um umlætting frá SFB. Henda skipan er ikki broytt, hóast SFB er lagt til Nærverkið sum ein partur av økinum “Børn og Ung”[17].

---

[11] Sektorábyrgd merkir, at einstaki myndugleikin hevur serstaka ábyrgd av, at neyðug stig verða tikin og útvegar fígging í hesum sambandi. T.d. hevur Mentamálaráðið ábyrgd av øllum tilboðum í skúlahøpi, meðan Nærverkið tekur ábyrgd av mennandi tilboðum eftir skúlatíð.

[12] Trivnaðartænastan.
[13] Dáin og Frítíðarheimið eru sjálvsognarstovnar við egnum stýri.
[14] Kemur í staðin fyri Fjálgulon.
[15] Umlættingin verður skipað soleiðis, at børn og ung ikki eru til umlætting saman við vaksnum.
[16] Ovaragøta 46.
[17] Nærverkið hevur sett ein arbeiðsbólk at endurskoða umlætting sum heild í Føroyum – bæði til vaksin og børn. Bólkurin skal verða liðugur við sítt arbeiði fyrst í mars 2010.

Vanliga fáa børn og ung umlætting 1 – 2 vikuskifti um mánaðin[18], alt eftir hvussu torført tað er at hava tey búgvandi heima. Tó er eisini møguleiki fyri at veita umlætting gerandisdagar, umframt summarumlætting eftir tørvi. Ongar reglar eru um, hvussu leingi børn og ung kunnu vera til umlætting, tískil er fíggjarkarmurin einasta forðing fyri, at veita umlætting yvir longri tíð.

Víst verður á, at foreldur eru glað fyri umlættingina, serliga á stovnunum. Tó kundu onkur foreldur ynskt sær, at møguleiki var fyri at fáa umlætting oftari. Eisini verður víst á, at tørvur er á, at bráðfeingis umlættingarpláss altíð eru tøk.

Viðmerkjast skal, at orkan til umlætting er avmarkað og ikki kann nøkta tørvin.

Sum hagtølini omanfyri vísa, veitti SFB umlætting til 49 familjur í 2009 ímóti 34 familjum í 2006.

#### 4.2.6. Samdøgursstovnur eftir § 16, stk. 1 í forsorgarlógini til børn, ið bera brek

§ 16, stk. 1 í forsorgarlógini gevur heimild til, at persónar við serligum tørvi, her í millum børn og ung, kunnu innskrivast á stovnar, sum landsstýrið rekur, ella sum landsstýrið hevur gjørt avtalu við. Talan er sostatt bæði um stovnar í Føroyum og uttanlands.

Sum nevnt omanfyri í pkt. 4, kunnu børn og ung, ið eru fevnd av forsorgarlógini innskrivast á stovn, sum hevur heimild í barnaverndarlógini, um pláss er á stovninum og viðkomandi fakliga kann sameinast við málbólkin hjá stovninum. Viðmerkjast skal, at landsstýriskvinnan, við heimild í § 33, stk. 4 í barnaverndarlógini, hevur góðkent eina skipsverkætlan[19], har børn og ung fevnd av forsorgarlógini, eisini kunnu innskrivast.

Harafturat kunnu ung, 18 ár og eldri, fevnd av forsorgarlógini, innskrivast á Rásina[20], sum er stovnur undir Mentamálaráðnum. Viðmerkjast skal, at tað ikki er ein treyt, at tey ungu verða innskrivað eftir § 16 í forsorgarlógini. Á Rásini læra ung at klára seg sjálvi so væl sum gjørligt. Pláss er fyri 6 ungum í senn, og verða hesi innskrivað fyri eitt 3 ára skeið.

Út um hesar samdøgursstovnar, eru eingir samdøgursstovnar í Føroyum til børn og ung við serligum tørvi.

Um einki nøktandi stovnstilboð er í Føroyum, er heimild í § 16, stk. 1 í forsorgarlógini at innskriva børn og ung á stovnar ella stovnslíknandi fyriskipan, sum landsstýrið hevur gjørt avtalu við. Viðmerkjast skal, at børn, t.e. yngri enn 14 ár, vanliga ikki verða send á samdøgursstovn uttanlands.

Tey ungu, sum eru á stovni uttanlands, hava oftast hesar trupulleikar:

- Sálarsjúka

---

[18] Umlættingin í SFB er frá fríggjadegi seinnapart til mánamorgun. SFB heintar børnini fríggjadag á dagstovni/toymi og koyrir tey aftur á dagstovn/skúla mánamorgun.

[19] Sí pkt. 4.3.2.

[20] Málbólkurin er ung við menningartarni.

- ADHD
- Autisma
- Umfatandi atferðartrupulleikar
- Menningartarn/Seinment

Flest ung, sum verða innskrivað á samdøgursstovn uttanlands, verða innskrivað á ein stovn, ið veitir eitt heildartilboð, t.v.s. at umframt sosialpedagogiska ella psykiatriska viðgerð, veitir stovnurin eitt nú skúlaundirvísing ella búvenjing og avkláring av arbeiðsførleika. Talvan niðanfyri vísir, hvussu nógv uppihald eru játtað uttanlands eftir § 16 í forsorgarlógini seinastu árini:




Viðmerkjast skal, at áðrenn 2009, tá mannagongdirnar vóru broyttar, vóru flestu stovnslíknandi uppihald uttanlands játtað eftir § 18, stk. 1 í forsorgarlógini sum endurbúgvingarskipanir. Um uppihald uttanlands sambært §§ 18 og 16 verða løgd saman, vísir gongdin tó, at talið er fallandi.

### 4.3. Tilboð og skipanir eftir barnaverndarlógini

Tey tilboð og skipanir, sum eru til børn fevnd av barnaverndarlógini, eru hesi:

- Fyribyrgjandi fyriskipanir
- Samdøgursstovnur fyri børn og ung
- Stovnslíknandi fyriskipan
- Ungdómsdeildin á Føroya Barnaheimi
- Serdagstovnur fyri børn, ið ikki kunnu integrerast á kommunalum dagstovni
- Familjudepilin
- Fosturforeldur
- Samdøgursstovnur uttanlands

Tá børn og ung verða sett á samdøgursstovn ella til fosturs, verða tey umsorganaryvirtikin. Talan er harafturímóti ikki um umsorganaryvirtøku, tá børn fáa tilboð á serdagstovninum, ella familjur verða innskrivaðar til familjuviðgerð á Familjudeplinum. Øll mál um umsorganaryvirtøku, umframt mál um at innskriva børn á serdagstovnin og familjur á

Familjudepilin, skulu leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina, sum tekur avgerð[21]. Viðmerkjast skal, at umlætting er ein fyribyrgjandi fyriskipan, ið ikki skal leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina[22].

Talvan niðanfyri vísir, hvussu nógv mál, býtt á fyriskipan, ið hava verið løgd fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina síðan 2006:




| | Umsorganaryvirtøka | Familjuviðgerð | Ókeypis umboðan | Serdagstovn | Umsorganaryvirtøka uttan samtykki frá foreldrunum |
|---|---|---|---|---|---|
| Ár 2006 | 29 | 5 | 3 | 0 | 11 |
| Ár 2007 | 60 | 4 | 8 | 0 | 9 |
| Ár 2008 | 53 | 9 | 10 | 0 | 3 |

Viðmerkjast skal, at sama mál kann verða lagt fyri nevndina fleiri ferð sama ár.

### 4.3.1. Fyribyrgjandi fyriskipanir

§ 15 í barnaverndarlógini gevur barnaverndarnevndunum heimild til at seta fyriskipanir í verk, um hetta er neyðugt, her í millum fyribyrgjandi fyriskipanir.

Við fyribyrgjandi fyriskipanir er at skilja aðrar fyriskipanir enn at umsorganaryvirtaka barnið ella tann unga og seta viðkomandi á samdøgursstovn. Tær fyribyrgjandi fyriskipanirnar stuðla barninum, tí unga ella familjuni soleiðis, at tey kunnu mennast, eitt nú við at veita stuðul í heiminum, veita sálarfrøðiliga hjálp, hjálpa við at finna hóskandi útbúgvingarpláss, veita barninum ella tí unga persónligan ráðgeva v.m.

Viðmerkjast skal, at tað eru kommunurnar/barnaverndarøkini, sum hava ábyrgdina av hesum tilboðum – eisini fíggjarliga.

Talvan niðanfyri vísir, hvussu nógv mál við fyribyrgjandi fyriskipanum barnaverndarøkini høvdu í 2008:

[21] Barnaverndarlógin §§ 19 og 15, stk. 4. Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur avgerð eftir tilmæli frá barnaverndarnevndini.
[22] Barnaverndarnevndin tekur einsamøll avgerð um umlætting.




### 4.3.2. Samdøgursstovnur fyri børn og ung

Stovnurin er nýggjur og er komin í staðin fyri stovnarnar Rókina og Slóðina, ið vóru lagdir saman undir ein felags leiðara í byrjanini av 2009. Hóast samanleggingina er einki, sum forðar fyri, at stovnurin húsast á ymiskum deildum, ið liggja hvør sær.

Talan er um ein samdøgursstovn, ið er ætlaður børnum og ungum í aldrinum 7 – 18 ár, við stórum og samansettum trupulleikum. Stovnurin skal kunna tillaga seg skiftandi tørvinum, soleiðis at børn og ung í minst møguligan mun verða send uttanlands til sosialpedagogiska viðgerð.

Stovnurin, ið hevur 8 samdøgurspláss, hevur heimild í barnaverndarlógini, men eisini børn fevnd av forsorgarlógini, ið hava somu trupulleikar, kunnu innskrivast á stovnin, um hesi fakliga kunnu sameinast við málbólkin hjá stovninum og pláss er tøkt.

Endamálið við at leggja Rókina og Slóðina saman, er, at royna at ganga atfinningunum á møti, sum hava verið ímóti stovnunum. Atfinningarnar hava m.a. verið, at málbólkarnir hjá stovnunum vóru ov avmarkaðir, og at stovnarnir ikki tóku ímóti børnum og ungum við stórum trupulleikum, umframt at ov fá børn og ung vóru innskrivað á stovnarnar.

Barnaverndartænasturnar vísa á, at fleiri av teimum hava havt góðar royndir við Rókini, men at útslúsingin frá Rókini og heimaftur ikki hevur verið góð nokk. Eisini vísa barnaverndartænasturnar á, at Slóðin ongantíð hevur virkað nøktandi, og at barnaverndartænasturnar hava kent seg ótryggar við at senda ung á Slóðina.

Við at leggja stovnarnir saman verður lættari at tillaga tilboðini til tørvin, sum er skiftandi yvir tíð. Harafturat verður mett, at tað fakliga umhvørvið hjá starvsfólkunum styrkist, soleiðis at stovnurin verður førur fyri eisini at taka ímóti børnum og ungum, sum hava stórar trupulleikar. Hetta eigur at hava við sær, at hesi børn og ungu í minst møguligan mun verða send á stovn uttanlands.

Eisini hava atfinningar verið at hølisviðurskiftunum hjá Rókini og Slóðini. Bygningarnir, har stovnarnir húsast, eru ikki bygdir til endamálið, og Slóðin heldur til miðskeiðis í Tórshavn, nakað sum verður mett at vera sera óheppið. Ásannandi at hølisviðurskiftini ikki hava verið nøktandi, verður leitað eftir nýggjum hølum til samanlagda stovnin uttanfyri Tórshavn.

Høvuðsbarnaverndarnevndin hevur innskrivað 14 børn og ung á Rókina og Slóðina í árinum 2006 - 2009. Talvan niðanfyri vísur harafturat, hvussu nógv **ymisk børn** hava verið innskrivað á einstaka stovninum hvørt árið. Talvan vísir ikki, í hvønn mun plássini verða nýtt til fulnar. T.d. vísa tølini fyri 2008, at í miðal hava 2,5 børn verið á Slóðini um mánaðin, meðan tilsvarandi tølini frá Rókina eru 2,2.




Fyrivarni verður tikið fyri tølunum fyri 2006.

### 4.3.3. Stovnslíknandi fyriskipan

Landsstýriskvinnan hevur við heimild í § 33, stk. 4 í barnaverndarlógini góðkent eina skipsverkætlan, ætlað ungum í aldrinum 13 – 18 ár, og í serligum førum upp til 21 ár.

Skipsverkætlanin hevur havt ung innskrivað eitt 5 mánaða skeið, og verður í løtuni endurskoðað.

### 4.3.4. Ungdómsdeildin á Føroya Barnaheimi

Føroya Barnaheim er sjálvsognarstovnur við egnum stýri. Tó verður virksemið fíggjað av tí almenna. Almannastovan hevði fíggjarligu ábyrgdina av Ungdómsdeildini til 1. september 2009, tá økið "Børn og Ung" bleiv flutt til Nærverkið at umsita.

Ungdómsdeildin er ein samdøgursstovnur ætlaður børnum í aldrinum 13 – 18 ár, ið eru umsorganarsvikin, umframt sosialt og kensluliga illa fyri. Ungdómsdeildin hevur 8 búpláss umframt 1 bráðfeingispláss.

Barnaverndartænasturnar vísa á, at Ungdómsdeildin virkar væl, men viðmerkja, at fortreytin er, at samansetingin av teimum ungu, sum koma á deildina, er innan fyri sama málbólk, og at tey ikki eru alt ov illa fyri.

Hagtølini niðanfyri vísa, hvussu nógv børn hava verið innskrivað á ungdómsdeildina í tíðarskeiðinum 2006 – 2009.




Talvan vísir talið av innskrivingum, men sigur onki um ta tíð, hvør einstakur er innskrivaður

### 4.3.5. Serdagstovnur

Serdagstovnurin er ein dagstovnur við 8 dagviðgerðarplássum fyri børn í aldrinum 0 – 7 ár við álvarsligum atferðar- og tilknýtistrupulleikum, umframt møguleika fyri vikuskiftis-umlætting.

Stovnurin byrjaði sítt virksemið í 2006 í Familjuhúsinum. Síðani virksemið byrjaði hevur einki barn verið innskrivað á dagstovnin, meðan eitt barn hevur verið til vikuskiftisumlætting.

Ásannandi, at einki barn bleiv innskrivað á serdagstovnin, varð virksemið í Familjuhúsinum víðkað til eisini at fevna um ráðgeving og vegleiðing til familjur við barni ella børnum, ið hava brek ella varandi víðfevnda sjúku. Sí punkt **4.2.2.** omanfyri. Tað víðkaða virksemið er tó tengt at, hvussu nógv børn eru innskrivað á Serdagstovninum.

Sum kunnugt hevur Familjudepilin nú yvirtikið virksemið hjá Familjuhúsinum og heldur fram í hølum hjá Føroya Barnaheimi. Mett verður, at um tørvur verður á serdagstovnatilboði ella vikuskiftisumlætting, ber til at bjóða hetta á Familjudeplinum.

### 4.3.6. Familjudepilin

Í byrjanini av 2009 varð Familjudeildin á Føroya Barnaheimi flutt frá Stýrinum fyri Føroya Barnaheim undir Almannastovuna, sum tá hevði umsitingina av økinum “Børn og Ung”.

Í hesum sambandi hevur Familjudepilin yvirtikið virksemið hjá Familjudeildini, umframt virksemið hjá Familjuhúsinum. Familjudepilin veitir tilboð sum fyriskipan, bæði sambært barnaverndar- og forsorgarlógini. Familjudepilin hevur enn ikki fult virksemi, men ætlanin er, at tilboðini hjá Familjudeplinum, umframt ráðgeving til familjur við barni/unglinga, ið hevur brek ella varandi víðfevnda sjúku, skulu umfata:

- sálarfrøðiliga ráðgeving
- eygleiðing og meting av børnum, ið skulu hava samdøgurstilboð
- familjuviðgerð sum dagviðgerðartilboð (barnavernd)
- samdøgurstilboð til familjur
- supervisjón til starvsfólk, stovnar og fyriskipanir á Nærverkinum, ið taka sær av børnum og ungum við serligum tørvi
- eygleiðing/kanning í sambandi við meting av foreldraførleika
- viðgerð í sambandi við foreldraførleika
- námsfrøðiliga virkisætlan fyri einstøk børn, her í millum øll á samdøgurstovni og ávís børn við víðfevndum breki
- vegleiðing til stovnarnar innan økið um sosialpedagogiskir viðgerðarhættir
- vegleiðing til stovnarnar viðvíkjandi tí einstaka barninum
- vegleiðing av foreldrum at børnum og ungum í samdøgursfyriskipan og styrkjan av samskiftinum og sambandinum millum foreldur og barnið ella tann unga, og millum foreldur og starvsfólk, sum eru um barnið ella tann unga, og
- stuðul og vegleiðing í sambandi við yvirgongd hjá tí unga til sjálvstøðuga tilveru, ella vendan heim aftur til foreldrini

Sum nevnt omanfyri, er virksemið á Familjudeplinum ikki komið í fastar karmar, og tískil er enn ógreitt, hvussu orkan verður nýtt í mun til einstøku uppgávurnar. Hetta má fáast í rættlag, nú stovnurin verður mannaður við serkønum fólki, so hann í mest møguligan mun nøktar tørvin innan bæði brek- og barnarverndarøkið. Greitt er eisini, at verandi fíggjarkarmur er ov trongur til alt tað virksemi, sum longu er lagt upp til.

Talvan niðanfyri vísir, hvussu nógvar familjur hava verið innskrivaðar til samdøgurstilboð:




Viðmerkjast skal, at flestu familjurnar hava verið á deildini í umleið 3 mánaðir, onkrar tó styttri, hetta uttan mun til, um tær hava verið innskrivaðar fyri longri tíðarskeið.

#### 4.3.7. Fosturforeldur

Fosturforeldraskipanin tekur ímóti børnum sum:

- fyribils verða sett til fosturs
- varandi verða sett til fosturs
- skulu til umlætting

- bráðfeingis verða sett í fosturheim

Børn og ung kunnu soleiðis verða sett til fosturs hjá góðkendum fosturforeldrum í staðin fyri at verða sett á samdøgursstovn, ella vera til umlætting hjá fosturforeldrum, um familja teirra er illa fyri, ella barnið hevur tørv á serligari stimbran e.l.

Fosturforeldrini eru sum familjur flest, og hava sostatt vanliga ikki serligar førleikar at taka sær av børnum og ungum við serligum tørvi. Tískil er neyðugt, at tað barnið ella tann ungi, sum verður settur til fosturs, ikki hevur so stórar trupulleikar, at hesir syndra fosturfamiljuna. Tey árini fosturforeldraskipanin hevur virkað, er tað oftast yngri børn, og børn sum ikki eru alt ov illa fyri, sum hava verið sett til fosturs.

Fosturforeldur hava í flestu førum lønt starv við síðuna av at vera fosturforeldur. Tó eru nøkur fosturforeldur, sum í styttri ella longri tíð virka burturav sum fosturforeldur.

Fosturforeldrini fáa regluliga bjóðað týðandi skeið fyri at loysa uppgávuna sum fosturforeldur. Harumframt fáa fosturforeldrini ráðgeving og supervisjón frá Fosturforeldraskipanini eftir tørvi. 80 foreldur hava í løtuni børn til fosturs. Hagtøl vísa, at í oktober 2009 vóru tilsamans 123 børn og ung hjá fosturforeldrum. Av teimum vóru 53 til fosturs fyribils ella varandi, meðan 70 vóru til umlættingar. Talvan niðanfyri vísir tal av børnum og ungum, sum eru til fosturs fyribils ella varandi, býtt á aldur og kyn:




| | 0 til 6 ár | 7 til 13 ár | 14 til 18 ár | 19 til 20 ár |
|---|---|---|---|---|
| Gentur | 6 | 16 | 9 | 0 |
| Dreingir | 6 | 12 | 4 | 0 |

### 4.3.8. Samdøgursstovn uttanlands

Tá einki nøktandi tilboð er til børn ella ung í Føroyum, kann landsstýriskvinnan loyva, at tey verða sett á stovn uttanlands eftir barnaverndarlógini § 33, stk. 3.

Vanliga verða yngri børn ikki sett á stovn uttanlands. Tey ungu, sum eru sett á stovn uttanlands, hava hesar høvuðstrupulleikar, umframt at vera umsorganarsvikin:

- sálarligar trupulleikar
- álvarsligir atferðartrupulleikar
- ADHD
- rúsevnismisnýtslu

Talvan niðanfyri vísir, hvussu nógv ung hava verið sett á samdøgursstovn uttanlands:




### 4.3.9. Umlætting

Ein familja, ið hevur eitt barn ella ein ungan við serligum tørvi, sum er fevnt av barnaverndarlógini, kann fáa umlætting hjá fosturforeldrum.

Fosturforeldur, ið hava børn ella ung til fosturs, fáa vanliga ikki umlætting. Hetta vísandi til endamálið við fyriskipanini – at barnið ella tann ungi skal kenna seg sum part av familjuni – og tí at børnini og tey ungu vanliga ikki eru so illa fyri, at tað verður mett neyðugt við umlætting. Í serligum førum, tá barnið ella tann ungi hevur ein heilt serligan tørv, fáa fosturforeldrini tó umlætting. Barnið ella tann ungi fer tá til umlætting hjá øðrum fosturforeldrum.

## 4.4. Sjónveik

Børn og ung við sjóntrupulleikum, hava tørv á tilboðum, ið kunnu stuðla teimum til sjálvbjargni, bæði í heimi, skúla, arbeiði og frítíð.

### 4.4.1. Sernámsdepilin

Sum skipanin er í dag, varðar Sernámsepilin av børnum og ungum upp til 18 ára aldur.

Í fleiri ár hevur Sernámsdepilin haft sjónráðgeva í starvi. Ymisk tíðarskeið hevur tó eingin ráðgevi verið, og í løtuni er ongin sjónráðgevi í starvi á Sernámsdeplinum.

### 4.4.2. Sjóndepilin

Sjóndepilin er ein sjálvsognarstovnur undir Almannamálaráðnum, sum í høvuðsheitinum veitir tænastur til vaksin. Endamálið við Sjóndeplinum er at virka sum ein miðstøð fyri blindum og sjónveikum í Føroyum. Hetta verður gjørt við vegleiðing, frálæru og uppvenjing at stuðla til sjálvbjargni bæði í heimi, arbeiði og frítíð.

Fólk við sjóntrupulleikum kunnu her fáa frálæru í ymiskum lærugreinum, luttaka á skeiði, sosialum tiltøkum og øðrum felags áhugamálum. Sjónveik kunnu koma til roynd av hjálpartólum og annars fáa vegleiðing eftir tørvi.

Til tíðir, tá eingin sjónráðgevi hevur verið á Sernámsdeplinum, hevur Sjóndepilin, eftir áheitan frá Sernámsdepilinum veitt tænastur til børn og ung.

Víst verður á, at Sjóndepilin er vælvirkandi og gevur ta hjálp og tann stuðul, tørvur er á hjá blindum og sjónveikum.

Mett verður, at tað eigur at verða umhugsa, um Sjóndepilin í framtíðini eisini skal taka sær av børnum og ungum.

### 4.5. Teknmál

Deyv og hoyribrekað hava tørv á teknmáli umframt teknmálstulking, til tess at kunna samskifta við onnur. Um alt teirra samskifti skuldi verið skrivligt, vildi samskiftið verið stirvið og drúgført.

#### 4.5.1. Teknmálstulkatænastan

Teknmálstulkatænastan er ein sjálvstýrandi eind undir Almannamálaráðnum, sum kann veita tulk til alt slag av samskifti, har deyv ella hoyribrekað og hoyrandi møtast, og har almenn upplýsing og tiltøk fara fram. Tulkað verður millum føroyskt og danskt teknmál og føroyskt og danskt talumál. Í ávísum førum verður eisini tulkað millum norðurlendskt og enskt talumál.

#### 4.5.2. Teknmálslæra

Sernámsdepilin (SND) hevur ábyrgdina av at skipa fyri, at deyv og hoyribrekað børn og ung fáa frálæru í teknmáli. Harafturat undirvísir SND í tekn til talu. Tekn til talu undirvísingin verður givin í mun til tørvin hjá tí einstaka barninum. SND vísir á, at foreldrini altíð verða tikin við og fáa neyðuga undirvísing, soleiðis at tey kunnu samskifta við børnini og tey ungu. Foreldrafelagið Hoyrnin ger tó vart við, at viðurskiftini, sum er, ikki eru nøktandi, og at serligi førleikin á økinum eigur at verða miðsavnaður í mest møguligan mun.

Í dag fáa flest øll deyv eitt CI-implantat, sum ger, at tey fáa eina ávísa hoyrn. SND vísir á, at tað í hesum sambandi verður skipað fyri viðkomandi undirvísing, men ikki í teknmáli, tí tað ikki er viðkomandi fyri hesi.

Annars hevur verið víst á fyri Almannamálaráðnum, at upplæring og viðlíkahaldsvenjing av familjuni hjá deyvum ella hoyribrekaðum børnum og ungum ikki er nøktandi, og at tað vantar upplæring í “tekn til talu”.

## 5. Bygnaðurin

Sum frá er liðið, er bygnaðurin á økinum Børn og Ung broyttur. Á skjølunum 1 – 3 er yvirlit yvir bygnaðin í søguligum høpi lýstur.

## 5.1. Bygnaðurin fram til 2009

Síðani 1. januar 2006, tá barnaverndarlógin varð sett í gildi, hevur Almannastovan umsitið stovnarnar Rókin, Slóðin og Familjuhúsið, umframt Stuðulsfólkaskipanina fyri børn (SFB) og dagstovnin Reiðrið.

Føroya Barnaheim hevur virkað í mong ár. Í eina tíð hevur Føroya Barnaheim havt tvær deildir – ungdómsdeildina og familjudeildina. Hóast Føroya Barnaheim hevur egið stýri, hevur Almannastovan m.a. havt fíggjarligu ábyrgdina av stovninum.

Teir tríggir umlættingarstovnarnir Dáin, Frítíðarheimið og Kelduskákið, verða umsitnir av Trivnaðartænastuni hjá Nærverkinum.

Fosturforeldraskipanin, ið er fyri alt landið, er stovnsett av kommununum, og verður umsitin av Barnaverndarstovu Føroya, ið er ein felagskommunalur stovnur. Fosturforeldraskipanin byrjaði sítt virksemið 1. januar 2006.

Síðan barnaverndarlógin varð sett í gildi, hava barnaverndarøkini hvør sær havt ábyrgdina av at veita fyribyrgjandi fyriskipanir eftir barnaverndarlógini.

## 5.2. Bygnaðurin í 2009

Í 2009 eru bygnaðarbroytingar framdar á økinum, soleiðis at øll tilboð og skipanir til børn, ung og familjur teirra, uttan stovnarnir Dáin, Frítíðarheimið og Kelduskákið, eru skipað undir økinum "Børn og Ung", og vísa til leiðaran, ið er settur fyri økið. Harafturat eru stovnar lagdir saman, og ein partur av virkseminum hjá Føroya Barnaheimi, familjudeildin, er flutt til økið "Børn og Ung".

Høvuðsorsøkin til broytingina var at leggja ábyrgdina av teimum ymsu stovnunum til *ein* myndugleika og at samskipa raksturin av teimum, umframt eitt ynski um, at loysa nakrar av markamótstrupulleikunum, sum eru ímillum forsorgarlógina og barnaverndarlógina. Við hesum fáa børn við breki og børn við sosialum trupulleikum somu sømdir. Hóast børn og ung og familjur teirra, ið eru fevnd av forsorgarlógini, oftast hava aðrar trupulleikar enn tey, sum eru fevnd av barnaverndarlógini, eru tað fleiri, sum hava somu trupulleikar og sama tørv. Við at leggja hesi tilboð og skipanir til børn, ung og familjur teirra undir sama leiðara, verður mett, at markamótstrupulleikarnir gerast lættari at loysa, soleiðis at tað verður tørvurin hjá tí einstaka, sum verður avgerandi fyri, hvat tilboð viðkomandi kann fáa. Harafturat verður mett, at tað verður lættari at gagnnýta serkunnleikan hjá starvsfólki innan økið, til frama fyri øll við serligum tørvi, sama hvørji lóggávu tey eru fevnd av.

Í fyrstu atløgu varð økið "Børn og Ung" skipað undir Almannastovuni, men varð hin 1. september 2009 flutt til Nærverkið at umsita.

Ongar broytingar er gjørdar viðvíkjandi fyribyrgjandi fyriskipanum eftir barnaverndarlógini. Barnaverndarøkini hava sostatt framvegis ábyrgdina av at veita hesar fyriskipanir. Harafturat verður Fosturforeldraskipanin framvegis umsitin av Barnaverndarstovu Føroya.

Umleggingarnar á stovnsøkinum seinnu árini hevur havt ávísa órógv við sær, men verður økið samskipað í størri mun og tilfeingið gagnnýtt til fulnar, eru líkindi fyri, at støðan serliga innan brekøkið fer at batna munandi. Hinvegin kann orsøk vera at stúra um tilboðini, um samlaði játtanarkarmurin verður læstur fastur á sama støði komandi árini.

# 6. Fyrimunir og vansar við galdandi skipan

Sum lýst omanfyri, eru tilboð og skipanir til børn, ung og familjur við serligum tørvi fevnd av ymiskum lógum. Harafturat liggur ábyrgdin hjá ymiskum myndugleikum. Soleiðis sum ábyrgdarbýtið er í dag, hevur landið ábyrgdina av øllum tilboðum eftir forsorgarlógini, útgreiningini, umframt stovnstilboðunum eftir barnaverndarlógini. Harafturímóti hava kommunurnar ábyrgdina av øllum øðrum fyriskipanum eftir barnaverndarlógini, umframt Fosturforeldraskipanini.

Á skjali 4 er yvirlit yvir tilboðini, umframt ábyrgdarbýtið.

Sjóndepilin, Teknmálstulkatænastan, Rásin og fólkaskúlin eru ikki tikin við í yvirlitið.

## 6.1. Barnaverndarøkini

Í sambandi við støddina á barnaverndarøkjunum verður mett, at økini í summum førum eru ov smá. Trupulleikin við smáum økjum er, at vandi er fyri, at barnaverndarmálini gerast persónlig, umframt at trupult kann verða at fáa starvsfólk við neyðuga fakliga førleikanum til økið; her verður ikki bert hugsað um málsviðgerar til barnaverndartænasturnar, men eisini onnur fakfólk, t.d. sálarfrøðingar og familjuráðgevar, sum tørvur kann verða á í sambandi við fyribyrgjandi fyriskipanir.

Fyribyrgjandi fyriskipanir eru kostnaðarmiklar. Tískil er vandi fyri, tá økini eru smá, at ikki øll økini hava fíggjarliga orku at seta í verk fyriskipanir, sum tey vildu havt sett í verk, um fíggjarliga orkan var til tað. Hetta kann tó loysast við fíggjarligari útjavning.

## 6.2. Fyribyrgjandi fyriskipanir

Viðvíkjandi teimum fyribyrgjandi fyriskipanunum eftir barnaverndarlógini er tað ein fyrimunur, at ábyrgdin fyri hesum liggur hjá kommununum/barnaverndartænastunum. Tær eru nærri borgaranum, og hava størri kunnleika til nærumhvørvið og tí orku, sum har er, og sum kann brúkast í sambandi við fyribyrgjandi fyriskipanir. Samstundis er tað ein tilskundan at seta ymisk tiltøk í verk í nærumhvørvinum, sum kunnu koma børnunum og teimum ungu til góðar.

## 6.3. Útgreining

Útgreiningin liggur í dag hjá tveimum ymiskum myndugleikum, ávikavist hjá Mentamálaráðnum og Heilsumálaráðnum.

Núverandi skipan hevur víst, at hon ikki megnar at gera eina heildarútgreining – partarnir arbeiða í stóran mun hvør í sínum lag. Harafturat tekur tað langa tíð, frá tí at illgruni er um,

at barnið ella tann ungi hevur serligan tørv, til endalig útgreining fyriliggur. Hetta m.a. tí at alt ov long bíðitíð er bæði á SND og á Psykiatriska deplinum.

Hetta hevur við sær, at barnaverndartænasturnar í ávísum førum fáa børn og ung útgreinað hjá privatpraktiserandi sálarfrøðingum, í summum førum donskum sálarfrøðingum. Hetta tyngir barnaverndartænasturnar fíggjarliga og er tískil ikki altíð ein fíggjarligur møguleiki hjá barnaverndartænastunum.

Mett verður, at orsøkin til at skipanin ikki virkar nøktandi m.a. er, at tað eru tveir myndugleikar, ið hava ábyrgd av hvør sínum parti av útgreiningini, og at myndugleikarnir ikki hava samskipað útgreiningina soleiðis, at tað kann gerast ein heildarútgreining. Um ábyrgdin fyri útgreiningini lá hjá *einum* myndugleika, átti hesin trupulleiki at verið loystur.

Ábyrgdin fyri útgreiningini liggur í dag hjá landinum, og ivasamt er, um hetta er rættast. Higartil er uppgávan ikki loyst á nøktandi hátt, men við at skipa landið í nøkur øki við dyggari NSR-tænastu (sí tilmæli undir **9.5.**) ber til at veita neyðugu ráðgevingina, samstundis sum at útgreining kann miðsavnast á einum staði við serkønum fólki. Havast má eisini fyri eyga, at talan eigur at vera um útgreining í mun til einstaka barnið ella tann unga sum heild, t.v.s. uttan mun til hvør myndugleiki hevur ábyrgdina av at veita tey tilboð ella skipanir, sum eiga at verða settar í verk. Ein slík útgreining eigur at verða óheft av teimum, ið annars eru um barnið.

Viðmerkjast skal tó, at mett verður ikki at núverandi útgreining er nøktandi. Landið hevur ikki megna at raðfest hetta økið. Ein fyritreyt fyri eini útbygging av økinum er tí, at neyðug fígging fæst til endamálið.

### 6.4. Økið "Børn og Ung"

Sambært teimum sjónarmiðum, ið Almannamálaráðið hevur á stovnsøkinum, kann metast, at farið var undir eina skilagóða tilgongd í 2009, tá avgerð var tikin um at skipa tilboð eftir forsorgarlógini, umframt stovnstilboð eftir barnaverndarlógini, undir sama myndugleika. Á henda hátt er lættari at leggja tilboðini soleiðis til rættis, at tað er tørvurin hjá barninum ella tí unga, sum er avgerandi, og ikki hvørjari lóggáva viðkomandi er fevndur av.

Fyri barnaverndartænasturnar loysir hetta hin vegin ikki grundleggjandi trupulleikan við markamóti og ivamálum mótvegis stovnsøkinum. Tá barnaverndartænasturnar skulu seta børn heiman, er neyðugt við einum tøttum samstarvi við stovnarnar. Markamótstrupulleikin millum barnaverndartænasturnar og samdøgursstovnarnar hevði verið loystur, um barnaverndartænasturnar høvdu ræðið á stovnsøkinum. Hinvegin vildi tað havt við sær, at markamótstrupuleikarnir millum barnavernd og mál viðvíkjandi børnum og ungum við breki gjørdust enn størri.

Tað er tó ivasamt, hvørja ávirkan møguligar sparingar kunnu hava á tilboðini og skipanirnar, um kommunurnar hava ábyrgdina av økinum. Tá økið liggur hjá landinum, er tað landspolitikarin sum hevur ábyrgdina, og vil møgulig sparing á økinum kunna hava politiskar fylgir fyri politikaran, og tískil gera sítt til, at politikarin arbeiðir fyri at fáa fleiri

pengar til økið. Um kommunurnar hava ábyrgdina av økinum, og neyðugt verður hjá teimum at spara, kann ikki roknast við, at eyka fígging fæst frá landinum.

### 6.5. Stuðulsfólkaskipanin fyri Børn

At SFB nú er undir Nærverkinum, eigur at hava við sær, at tað verður lættari at tilrættisleggja umlættingina soleiðis, at starvsfólk og pláss á umlættingarstovnunum kann nýtast enn betri. Hetta tí, at SFB nú er undir myndugleikanum, sum hevur umlættingarstovnarnar, samstundis sum at Nærverkið nú eisini fær vitan um, hvørja umlætting SFB veitir. Eisini eigur hetta at hava við sær, at øll sum hava sama tørv á umlætting verða sett líka.

Harumframt verður mett, at toymið hjá SFB kunnu gera avtalu um at brúka umlættingarstovnarnir, um tíðarskeið eru, har hesir ikki verða brúktir til umlætting.

Eisini skal havast í huga, at starvsfólkini í SFB og Stuðulstænastuni kunnu stuðla og læra av hvørjum øðrum, umframt at yvirgongdin frá barna- til vaksnamannatilveruna eigur at gerast smidligari. Havast skal í huga, at gerandisdagurin hjá brúkaranum ikki broytist, hóast hann gerst 18 ár og myndigur.

Harafturat verður mett, at flytingin av SFB til Nærverkið, sum eisini umsitur bústovnar og sambýli, fer at hava við sær, at Nærverkið fær eitt betri heildaryvirlit yvir framtíðar tørvin – bæði í mun til Stuðulstænastuna og bútilboð.

Í sambandi við umsóknir um umlætting er mannagongdin í dag tann, at foreldur senda umsókn um umlætting á umlættingarstovnum beinleiðis til Nærverkið, meðan umsókn um umlætting frá SFB verður send til Almannastovuna. Henda skipan ger, at torført er at fáa yvirlit og neyðug hagtøl yvir veruliga tørvin[23].

### 6.6. Samdøgurstilboð

At samdøgurstilboðini eru flutt til Nærverkið at umsita, hevur ávísar fyrimunir. Nærverkið hevur serliga vitan í at reka samdøgursstovnar.

Tá ábyrgdin liggur hjá landinum, er tað Løgtingið, sum í sambandi við fíggjarlógina avger, hvat tænastustøðið skal vera fyri alt landið. Tó er vandi fyri, at tænastustøðið, sum landið leggur, ikki samsvarar við tørvin og ynskini hjá kommununum. Frástøðan frá brúkaranum til landspolitikaran er størri enn til kommunalpolitikaran.

Ein annar vansin við, at landið umsitur og rekur stovnarnar er, at tað yvirhøvur eru barnaverndartænasturnar, sum kenna tørvin. Hetta er nýtt virkisøki hjá Nærverkinum. Tað krevur tískil – sum omanfyri nevnt – tætt samstarv millum partarnar, um stovnstilboðini í Føroyum skulu svara til tann tørv, sum til einhvørja tíð kann stinga seg upp. Um samstarvið ikki virkar, er vandi fyri, at samdøgurstilboðini ikki eru tey røttu. Tað hevur víst seg torført at fáa hetta samstarv at virka nøktandi, tá saman um kemur.

---

[23] Nærverkið hevur sett ein arbeiðsbólk at endurskoða umlættingina.

Harafturat tekur tað oftast longri tíð at fáa broytingar ígjøgnum, á økjum sum landið umsitur, enn økið sum kommununar umsita.

### 6.7. Fosturforeldraskipanin

Semja er um, at Fosturforeldraskipanin er munandi smidligari skipan fyri barnaverndartænasturnar at brúka enn samdøgursstovnarnir, sum landið rekur, orsakað av, at henda skipan er so tætt tengd at barnaverndartænastunum kring alt landið.

Tað er ein vansi, at fosturforeldraskipanin og stovnstilboðini ikki eru undir sama myndugleika. Tá hesar samdøgursfyriskipanir ikki eru undir sama myndugleika, hevur hetta við sær, at hesar fyriskipanir ikki, ella í lítlan mun, verða hugsaðar at kunna stuðla upp undir hvørja aðra, og tískil verða førleikar og møguleikar møguliga ikki brúktir til fulnar.

### 6.8. Samdøgurstilboð uttanlands

Um einki nøktandi samdøgurstilboð er í Føroyum til børn og ung, kunna hesi fáa játtað uppihald uttanlands.

Tá talan er um børn og ung fevnd av barnaverndarlógini, er tað Høvuðsbarnaverndarnevndin, ið, eftir tilmæli frá barnaverndartænastunum, tekur avgerð um, hvørt ein barn ella unglingi skal á stovn uttanlands. Lógin krevur tó, at landsstýrismaðurin gevur loyvi. Landsstýrismaðurin kann siga nei, men tað er ógvuliga trupult, tá tey, sum hava tað fakliga innlitið í tað ítøkiliga málið meta, at hetta er neyðugt. Sostatt hevur landsstýrismaðurin í roynd og veru ikki avgerandi orðið at siga, sjálvt um landið heldur meginpartin av útreiðslunum.

Eingir samdøgursstovnar eru til børn og ung fevnd av forsorgarlógini. Um hesi hava tørv á einum viðgerðar- ella menningartilboði[24] á einum samdøgursstovni, og ikki fakliga kunnu sameinast við málbólkin hjá stovninum, sum hava heimild í barnaverndarlógini, er einasti møguleiki, at senda hesi uttanlands á samdøgursstovn[25]. § 16[26] í forsorgarlógini heimilar, at eitt nú børn og ung kunnu fáa uppihald á einum stovni, sum Landsstýrið rekur ella hevur gjørt avtalu við.

Henda lógargrein er trupul at umsita, tí hon er sera breitt orðað og mannagongdin er tung. Tann breiða orðingin ger, at nærum øll eru fevnd av greinini. Tískil er torført at grundgeva fyri, hví ein persónur ikki kann fáa uppihald uttanlands eftir greinini. Harafturat er mannagongdin tung. Í praksis er mannagongdin soleiðis, at Almannastovan sendir tilmæli til landsstýrismannin um at játta uppihald til ein ávísan persón á einum ávísum stovni. Landsstýrismaðurin kann síðan geva Almannastovuni heimild at gera avtalu við stovnin, og harvið játta uppihaldinum. Eins og tá talan er um børn og ung fevnd av

[24] Til dømis búvenjing ella arbeiðsavkláring.

[25] Tó hava børn og ung fevnd av forsorgarlógini í ávísan mun atgongd til samdøgursstovnarnir, sum hava heimild í barnaverndarlógini.

[26] Málbólkurin í § 16 er persónar sum hava tørv á stuðli alt samdøgrið. § 18 hevur ein annan málbólk.

barnaverndarlógini, er tað trupult hjá landsstýrismanninum at nokta uppihaldi uttanlands, tá tey, ið hava fakliga innlitið í tað ítøkiliga málið meta, at uppihaldið er neyðugt.

Henda loysn verður tó einans nýtt í teimum førum, har nøktandi stovnstilboð ikki finnast her á landi, og tá er talan um alneyðug tilboð innan serøki, ið enn ikki eru ment í Føroyum. Møguleikin at fáa børn og ung á serstovnar uttanlands kann bæði metast sum ein fyrimunur og ein vansi.

Talan er um góð stovnstilboð, ið menna børnini, men samstundis eggjar hetta ikki stovnunum í Føroyum at gera seg galdandi á hesum øki.

### 6.9. Samstarv, tá mál eru fevnd av bæði forsorgarlógini og barnaverndarlógini

Í ávísum málum er talan um, at barnið ella tann ungi er fevndur av bæði barnaverndarlógini og forsorgarlógini. Í nøkrum førum hevur tað víst seg trupult at fáa nøktandi samstarv í lag. Ofta vísa myndugleikarnir til hvønn annan, sum um málið bert hoyrir heima hjá tí eina myndugleikanum, ella sagt á annan hátt: eingin vil hava ábyrgdina av málinum. Sí eisini **7.2.** Tørvur er á greiðum mannagongdum og leiðreglum í slíkum førum.

### 6.10. Vantandi samskipan

Soleiðis sum bygnaðurin er í dag, er eingin felags skráseting av børnum og ungum við serligum tørvi. Tað hevur við sær, at teir ymisku myndugleikarnir bert hava vitan um tey børn og ungu, sum teir hvør í sínum lagi hava verið í sambandi við. Hetta hevur við sær, at trupult er at fáa neyv hagtøl, tá metast skal um framtíðar tørvin, og har við at hava neyðugu tilboðini klár, tá tørvur er á teimum. Havast skal í huga, at tað eru ymiskir myndugleikar, ið hava ábyrgdina av tilboðunum, ið børnini og tey ungu hava tørv á, sum frá líður.

Hjá familjum við serligum tørvi er størsti vansin við verandi bygnaði, at trupult er hjá teimum at vita, hvar tey skulu venda sær við sínum trupulleikum. Harafturat er oftani neyðugt hjá familjuni at venda sær til fleiri myndugleikar. Familjan virkar á henda hátt sjálv sum samskipari í málinum, og krevur hetta nógva orku hjá familjuni. Ein gongd leið burtur úr hesi truplu støðu hevði verið, at tað verður lógarásett, at setast skal inn tvørfakliga í mun til einstaka barnið og brek tess, eins og tað er ásett í barnaverndarlógini.

## 7. Gráøkis- og markamótstrupulleikar

Soleiðis sum bygnaðurin er í dag, eru gráøkis- og markamótstrupulleikar bæði ímillum myndugleikar og ímillum lógir undir sama myndugleika.

Við gráøkistrupulleikar er at skilja, at ivi er um, hvørjum reglum eitt mál er fevnt av.

Við markamótstrupulleikar er at skilja, at eitt mál fellur úr eini skipan og skal inn í eina aðra skipan. Sum oftast, men ikki altíð, skiftir málið samstundis millum myndugleikar.

Gráøkis- og markamótstrupulleikar hava onkuntíð við sær, at familjur blíva vístar frá einum myndugleika til annan, tí at myndugleikarnir ikki eru samdir um, hvør hevur

ábyrgdina av málinum. Í ávísum málum er eisini hent, at barnið ella tann ungi eru "dottin niður ímillum" skipanirnar.

Viðmerkjast skal, at børn og ung við serligum tørvi oftani hava samansettar trupulleikar, soleiðis at fleiri myndugleikar sambært *sektorábyrgdini*[27] hava skyldu til at veita teimum eina tænastu, samstundis. Her hevur tað stóran týdning, at teir ymisku myndugleikarnir hava fíggjarliga orku til at veita tænastuna.

### 7.1. Millum myndugleikar

Millum myndugleikar er at skilja sum millum kommunur og landið, og sum millum ymisk aðalráð, ið hava hvør sítt ábyrgdarøki.

#### 7.1.1. Millum kommunur og landið

Sambært § 5 í dagstovnalógini[28] hava kommunurnar skyldu at bjóða børnum við serligum tørvi pláss á dagstovni og dagrøkt á jøvnum føti við onnur børn, sum búgva í kommununi, um børnini kunnu integrerast í kommunalu ansingarskipanina. Um eitt barn hevur ein heilt serligan tørv, og hetta barnið ikki kann integrerast í kommunalu ansingarskipanina, skal barnið fáa annað tilboð sambært § 32c í forsorgarlógini, sum SFB undir Nærverkinum umsitur.

Í ivamálum er óheft faklig nevnd sett at gera tilmæli um, hvørt barnið eigur at fáa tilboð eftir dagstovnalógini ella forsorgarlógini. Harafturat eru greiðar reglur um mannagongdir í sambandi við slík ivamál. Enn eru ikki nóg nógv mál løgd fyri nevndina til at sigast kann, at heilt greitt er, nær barnið skal ansast í kommunalu ansingarskipanini og nær tað skal fáa dagtilboð eftir forsorgarlógini. Kommunurnar vísa á, at eftir teirra meting verður gráøkið í ábyrgdarbýtinum gjørt størri enn tað eigur at verða, um hugt verður eftir viðmerkingunum til § 5 í dagstovnalógini, ið umrøða, hvussu víttfevnd tilboð kommunurnar skulu veita. Fylgjan av hesum meta kommunurnar vera, at landið sleppur undan at seta í verk serlig dagtilboð fyri bólkar av børnum við t.d. autismu og ADHD. Kommunurnar meta, at tørvurin á sernámsfrøðiligum tilboðum til hesi børn er so víttfevndur, at hann fer langt út um skyldurnar hjá kommununum sambært viðmerkingunum til lógina.

Tað má sostatt væntast, at tað framvegis fara at verða ósemjur millum kommunur og landið um, nær eitt barn hevur *heilt* serligan tørv og nær tað "bert" hevur serligan tørv.

Stuðulsfólkaskipanin fyri børn veitir sernámsfrøðilig dagtilboð til tey børn, sum verða mett ikki at kunna integrerast í kommunalu ansingarskipanini. Í løtuni eru 7 børn í landinum, sum fáa sernámsfrøðiligt dagtilboð frá SFB – 5 eru undir skúlaaldur og 2 eru í frítíðarskúlaaldri.

---

[27] Sektorábyrgd merkir, at einstaki myndugleikin hevur serstaka ábyrgd av, at neyðug stig verða tikin og útvegar fígging í hesum sambandi. T.d. hevur Mentamálaráðið ábyrgd av øllum tilboðum í skúlahøpi, meðan Nærverkið tekur ábyrgd av mennandi tilboðum eftir skúlatíð.

[28] Løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 38. frá 9. mai 2006.

Hóast eitt barn er í kommunalari ansingarskipan, kann barnið og familjan samstundis fáa tilboð frá SFB. SFB arbeiðir, har kommunalir stovnar ikki røkka. Um barnið t.d. hevur tørv á náttarvakt ella fylgjara til venjingar í dagtímunum, veitir SFB hetta. Harafturat kann familjan fáa onnur tilboð frá SFB, tá barnið ikki er i kommunalari ansingarskipan, t.d. umlætting. Sostatt kann barnið og familjan fáa veitingar frá fleiri myndugleikum í senn.

Kommunala skipanin hevur vanliga tilboð til børn upp til uml. 9 ára aldur[29] Eftir hetta kunnu foreldur søkja um stuðulstilboð frá SFB umvegis Almannastovuna.

Á barnaverndarøkinum er eitt markamót millum fyribyrgjandi fyriskipanir sambært § 15 í lógini um barnavernd, sum kommunurnar umsita og stovnstilboðini sambært 6. parti í somu lóg, ið er ábyrgdarøki hjá Almannamálaráðnum. Trupulleikin í hesum sambandi hevur verið, at stovnarnir ikki hava megnað at laga seg til skiftandi tørvin.

### 7.1.2. Millum Almannamálaráðið og Mentamálaráðið

Ein stórur trupulleiki í sambandi við børn og ung við serligum tørvi er, at fleiri av teimum ikki fáa nøktandi skúlatilboð. Talan er serliga um atferðartrupul børn og ung. Dømi eru um, at hesi børn og ungu í alt ov langa tíð bert fáa heimaundirvísing nakrar tímar um vikuna. Einki annað skúlatilboð hevur verið til hesi børn og ungu. Í ávísum førum eru tey send heim, ella sjálv farin heim úr skúla og tískil ikki fingið nakra undirvísing yvirhøvur.

Hetta kann hava álvarsamar fylgjur fyri hesi børn og ungu. Tá børn og ung ikki ganga í skúla saman við øðrum børnum og ungum, kann hetta skaða tey sosialt og vera við til at skapa afturstig í teirra menning, ið ger støðu teirra enn verri í mun til atferðartrupulleikar. Harafturat kann manglandi skúlakunnleiki skerja teirra møguleikar við at klára seg í vaksnamannalívinum, og klára at uppihalda sær og sínum.

Tað er trupult at siga, um einasta orsøkin er, at skúlin ikki megnar at finna rætta undirvísingarháttin til tað einstaka barnið ella unga, ella um aðrar fyriskipanir eisini áttu at havt verið settar inn, eitt nú frá almannaverkinum ella sjúkrahúsverkinum.

Ásannast kann tó, at tað er neyðugt, at øll trý verkini samstarva og seta inn samstundis, tá tørvur er á tí, um hesi børn og ungu skulu kunna mennast og gerast sjálvbjargin, og at hetta ikki verður gjørt í nóg stóran mun í dag.

Higartil hevur tað oftast víst seg, at tá hesi børn gerast tannáringar er trupulleikin vorðin so stórur, at foreldrini venda sær til almannaverkið at fáa hjálp, og at tað tá kemur fram, at viðkomandi als ikki hevur nøktandi skúlakunnleika. Harafturat vísir tað seg oftani, at trupulleikarnir hjá viðkomandi tá eru vorðnir so stórir, at viðkomandi hevur tørv á einum heildartilboði, ið umfatar bæði skúlaundirvísing, sosialpedagogiska- og psykiatriska viðgerð. Eitt tilboð, ið hevur víst seg sera trupult at fáa í Føroyum.

[29] Tað er eitt sindur ymiskt frá einari kommunu til eina aðra, um hetta tilboð er galdandi upp til 9 ára aldur, ella um tað bert er galdandi til 7 til 8 ára gomul børn.

Í tílíkum málum er endin oftast, at almannaverkið loysir trupulleikan og setur neyðugar fyriskipanir í verk, ið hava til endamáls at gera viðkomandi so sjálvbjargnan sum gjørligt – her í millum skúlaundirvísing og psykiatriska viðgerð.

Viðmerkjast skal tó, at ein flokkur við ADHD næmingum byrjaði í Tórshavn í august 2009. Hetta er eitt stig tann rætta vegin.

Eitt gráøki er í sambandi við ráðgeving og vegleiðing. Ein av uppgávunum hjá SND og NSR (Náms- og Sálarfrøðilig Ráðgeving), er at ráðgeva og vegleiða í øllum sernámsfrøðiligum spurningum, umframt at vegleiða soleiðis, at m.a. børn og ung eftir førimuni fáa høvi til at mennast á øllum økjum. Mett verður tó, at undirvísingarparturin higartil hevur verið raðfestur hægst, soleiðis at nøktandi ráðgeving og vegleiðing ikki verður givin á øðrum økjum við tí avmarkaða tilfeingi, sum er. Eisini Familjudepilin veitir ráðgeving og vegleiðing. Ansast má væl eftir, at fleiri stovnar ikki bjóða somu tilboð, eitt nú tí fakliga tilfeingið er so lítið í Føroyum.

Sum víst á undir **7.1.1.**, eru eisini gráøkis- og markamótstrupulleikar millum dagstovnalógina og forsorgarlógina, sum ávikavist Mentamálaráðið og Almannamálaráðið varða av.

### 7.1.3. Millum Almannamálaráðið og Heilsumálaráðið

Gráøkis- og markamótstrupulleikar eru bæði í mun til børn og ung, ið bera brek, og børn og ung við rúsevnis- ella sálarligum trupulleikum.

Sambært § 5 í lógini um sjúkrahúsverkið[30], sum Heilsumálaráðið varðar av, hava persónar sum búgva í Føroyum, rætt til ókeypis viðgerð frá sjúkrahúsverkinum. Í ávísum førum fevnir rætturin eisini um viðgerð í Danmark ella í øðrum landi. Sjúkrahúsverkið átekur sær eftir hesi lóg serkanningar, viðgerðir og røkt av bæði likamliga og sálarliga sjúkum fólki.

Ásannast má tó, at børn og ung við rúsevnismisnýtslu ella sálarsjúku ofta verða sett á samdøgursstovn, sum Almannamálaráðið varðar av, hóast hesir stovnar bert geva sosialpedagogiska viðgerð. Uppihaldið miseydnast oftast, tí hesi børn og ungu ikki klára at móttaka sosialpedagogiskum tilboði, fyrr enn tey eru rúsevnisfrí ella at tamarhald er á sálarsjúkuni. Tískil endar tað oftani við, at børn og ung við rúsevnismisnýtslu og sálarsjúku verða send á stovn uttanlands, har tey kunnu fáa neyðugu viðgerðina, antin eftir § 16 í forsorgarlógini ella § 33, stk. 3 í barnaverndarlógini. Tá talan er um rúsevnismisnýtslu finnast viðgerðastovnar, ið kundu tikið ábyrgd av viðgerð fyri ungar misnýtarar, men orsakað av vantandi fígging ber ikki til taka sær av hesum aldursbólki, sum er. Sambært Bláakross eru talið av ungum við rúsevnismisnýtslu vorðið so mikið stórt[31], at eitt serligt tilboð átti at verið sett á stovn. Víst kann verða á, at vit eiga fleiri vælútbúgvin fólk innan hetta serøki, so fakliga tilfeingið er til staðar, men ásannast má, at fíggjarliga grundarlagið má fáast til vega, um vit skulu taka hond um henda álvarsliga trupulleikan.

---

[30] Løgtingslóg nr. 64 frá 17. mai 2005 um sjúkrahúsverkið.

[31] Í 2008 vóru 8 ung fólki í sambandi við Bláakross, og í 2009 12 ung fólk, ið vóru undir 18 ár

Ein annar trupulleiki er í sambandi við fjølbrekað børn og ung við andingartóli. Spurningurin er, hvør eigur at hava ábyrgdina av hesum, tí hesi krevja nógva røkt. Í dag eru tað starvsfólk frá SFB, sum eru um børn og ung við andingartóli, hóast henda uppgáva má metast sum ein røktaruppgáva. Starvsfólkið hjá SFB er í stóran mun ikki útbúgvið heilsustarvsfólk. Hetta tí at uppgávurnar hjá SFB eru meira av námsfrøðiligum slagi.

Í sambandi við at børn og ung eru innløgd á sjúkrahúsi í Føroyum ella uttanlands, stinga trupulleikar seg upp í mun til, hvør skal syrgja fyri fylgjarum ella vaktum – heilsuverkið ella almannaverkið. Tá eitt nú fjølbrekað børn og ung við andingartóli eru innløgd, er tað oftast ein stuðul frá SFB, sum vakir yvir viðkomandi inni á sjúkrahúsinum.

Tað sama er galdandi í sambandi við royndarverkætlanina við viðgerðarskeiðum – petø viðgerð og intensiv fysioterapiviðgerð – til børn og ung við fjølbreki, sum Almanna-málaráðið í samstarvi við Almannastovuna og Klaksvíkar Sjúkrahúsi skipar fyri. Foreldur eru sera fegin um hesa viðgerð, ið heldur fram í 2010. Viðgerðarskeiðini verða í løtuni fíggjað eftir § 17 í forsorgarlógini[32].

Í mun til, at eitt barn, ið ber brek verður føtt, er tað óheppið, at Føðideildin á Landssjúkrahúsinum ikki tykist hava nakra skipaða mannagongd í hesum sambandi.

Almannastovan fær tó javnan fráboðanir frá Landssjúkrahúsinum, eisini frá føðideildini, um, at barn við breki er borið í heim[33], hóast mannagongdirnar ikki tykjast greiðar.

Eins og víst á undir **7.1.2**, er eitt gráøki í sambandi við ráðgeving og vegleiðing. Eisini heilsufrøðingarnir (Gigni) kunnu[34] bjóða vegleiðing um m.a. menning og trivnað, hetta bæði til børn og ung, foreldur, lærarar, dagrøktarar v.m. Tað eru sostatt tríggir stovnar, sum kunnu ráðgeva og vegleiða. Arbeiðsbólkurin tekur undir við ynskinum hjá Meginfelagi teirra brekaðu í Føroyum, at teir ymsu partarnir samstarva um eina miðvísa kreppuhjálp í sambandi við, at børn við breki verða fødd.

## 7.2. Millum lógir undir Almannamálaráðnum

Hóast Føroya Barnaheim er ein barnaverndarstovnur og verður fíggjaður av landinum, er tað stýrið fyri Barnaheimið, sum er setanarmyndugleiki hjá starvsfólkinum, ið starvast har. Hetta hevur við sær, at møguligt er ikki at brúka starvsfólk haðani á øðrum stovni, um tørvur er á tí. Hetta hevur við sær, at stovnsskipanin ikki er so smidlig, sum ynskiligt var, til tess at røkka málinum um, at helst øll børn skulu fáa nøktandi tilboð í Føroyum.

Annars eru flestu trupulleikar í sambandi við markamót og gráøki millum forsorgarlógina og barnaverndarlógina.

---

[32] Arbeiðsbólkurin hevur ikki viðgjørt spurningin um, hvørt petø viðgerðin eigur at veitast av sjúkrahúsverkinum ella almannaverkinum. Mett verður at hetta er ein politiskur spurningur.

[33] Sambært § 38 í forsorgarlógini skulu myndugleikar boða Almannastovuni frá um persónar, sum hava tørv á hjálp eftir forsorgarlógini.

[34] Sambært § 7 í løgtingslóg nr. 63 frá 17. mai 2005 um fyribyrgjandi heilsuskipanir fyri børn og ung.

Tað hevur í ávísum førum víst seg at vera ringt at meta um, hvørt eitt barn ella ein ungur er fevndur av barnaverndarlógini ella forsorgarlógini. Serliga tá talan er um sálarfrøðiligar sjúkuavgerðir. Um slíkt mál verður lagt fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina, tekur nevndin avgerð um, hvørt barnið ella tann ungi er fevnt av barnaverndarlógini. Kemur Høvuðsbarnaverndin til ta niðurstøðu, at barnið ella tann ungi ikki er fevndur av barnaverndarlógini, er viðkomandi í staðin fevndur av forsorgarlógini.

Harafturat er ógreitt, hvør hevur ábyrgdina av hvørjum, tá talan er um familjur við sosialum trupulleikum, og har eitt barn ella børn, ið bera brek eru í heiminum, t.v.s. tá talan er um mál, sum eru fevnd av bæði barnaverndarlógini og forsorgarlógini. Greiðar mannagongdir vanta, ið kunnu loysa trupulleikan.

Tá ung, fevnd av forsorgarlógini, sum fáa tilboð frá SFB, nærkast 18 ára aldri, tekur Almannastovan málið upp viðvíkjandi framtíðini hjá tí unga, t.v.s. meta um, hvørt tann ungi kann gerast heilt ella partvís sjálvstøðugur, ella tann ungi skal hava fyritíðarpensjón og skal víðari til aðrar skipanir hjá Nærverkinum. Um tann ungi skal í aðra skipan hjá Nærverkinum, er tað umráðandi at yvirgongdin er smidlig og at ongin ivi er um, at tann ungi fær neyðuga tilboðið, tá viðkomandi gerst 18 ár. Hóast økið "Børn og Ung" er flutt til Nærverkið at umsita, er markamót framvegis millum skipanirnar. Tó hevur Nærverkið nú vitan um tey børn og ungu, sum fáa tilboð frá SFB, áðrenn tey verða 18 ár, soleiðis at tað eigur at verða lættari at skipa yvirgongdina. Nærverkið kann tó bert hava neyðuga tilboðið klárt, tá viðkomandi gerst 18 ár, um fíggjarligu karmarnir eru til staðar á fíggjarlógini.

Eisini er markamót, tá ung fevnd av barnaverndarlógini verða 18 ár, tó í ávísum føri 21 ár. Um hesi ikki eru sjálvbjargin, tá tey røkka hendan aldur, skulu tey skifta til eina skipan eftir forsorgarlógini, tí tey ikki longur kunnu fáa tilboð eftir barnaverndarlógini. Um hesi ungu ikki eru ella kunnu gerast sjálvbjargin, og tískil hava tørv á búplássi frá Nærverkinum, er ikki vist, at nakað pláss er tøkt, tí bíðilisti er til búpláss. Sostatt er neyðugt við neyvum hagtølum og politiskum raðfestingum á økinum.

Viðmerkjast skal, at møguligt er í ávísum førum at fáa játtað uppihald uttanlands eftir § 16 í forsorgarlógini. Tískil kunnu nøkur ung skifta frá ávikavist SFB ella einum tilboði eftir barnaverndarlógini, til eitt fyribils uppihald uttanlands, áðrenn tey møguliga skulu hava eitt tilboð frá eini skipan undir Nærverkinum. Eisini her gevur bíðilistin til búpláss trupulleikar.

Foreldur at børnum, sum eru fevnd av forsorgarlógini, kunnu fáa endurgjald fyri mista inntøku, um tey uppihalda barninum heima sambært § 17. Nú SFB er flutt til Nærverkið at umsita, er enn eitt markamót komið og vandi er fyri, at trupulleikar kunnu stinga seg upp í hesum sambandi, tí tað er Almannastovan, ið umsitur § 17 í forsorgarlógini.

### 7.3. Loysnir

Markamót vilja altíð verða ímillum skipanir og myndugleikar. Spurningurin er bara, *hvar* markamótið er. Til tess at loysa hesar trupulleikar, er neyðugt klárt at áseta markamótini í lóggávuni, umframt at fáa sektorábyrgdina gjøgnumførda á økinum. Meginreglan um sektorábyrgd merkir, at tað er skyldan hjá tí einstaka myndugleikanum, sum hevur

ábyrgdina av eini tænastu, at syrgja fyri, at tænastan er tøk og tillagað serliga tørvinum hjá tí einstaka persóninum. Við sektorábyrgd á økinum verður eisini samanhangur millum vald og gjald, soleiðis at samband er millum fakligu og fíggjarligu ábyrgdina hjá teimum ymisku stovnsleiðarunum.

Harafturat er neyðugt – við virðing fyri hvørjum øðrum – at skipa samstarv og mannagongdir í sambandi við markamótini, soleiðis at eingin "dettur" ímillum skipanirnar, og eingin ivi er um, hvør ger hvat.

## 8. Tilboð og skipanir í framtíðini

Um tikið verður undir við teimum atfinningum, sum eru til verandi tilboð og skipanir, er neyðugt at sektorábyrgdin verður framd í verki, og at tann einstaki myndugleikin tekur ábyrgd og veitir ta tænastu, hann hevur skyldu til at veita.

Tað er umráðandi at hugsa um barnið, tann unga og familjuna sum eina heild, samstundis sum hugsað verður um heildina hjá tí einstaka persóninum. Støðan er so at siga altíð soleiðis, at tann einstaki hevur tørv á ymiskum tilboðum frá ymiskum myndugleikum samstundis[35].

Fyri at kunna hjálpa tí einstaka, er í fyrstu atløgu neyðugt, á einum fakligum grundarlagi, at fáa staðfest tørvin hjá viðkomandi. Tá tørvurin er staðfestur, mugu tilboð og skipanir vera, sum kunnu nøkta serliga tørvin, her í millum faklig ráðgeving og vegleiðing.

Grundleggjandi fyri menningina av samdøgursstovnunum er, at teir hava eitt greitt – men eisini rúmligt – virðisgrundarlag at virka á í mun til tørvin. Hetta fevnir eisini um endamálsorðing og mannagongdir fyri, hvussu fakliga virksemið fer fram, her í millum við regluligari supervisión. Til tess at tryggja, at kósin verður hildin, er ein óheft eftirlitsskipan neyðug.

Ásannandi at tørvurin er skiftandi sum frá líður, er umráðandi, at skipanin er smidlig, soleiðis at tilboðini kunnu tillaga seg og nøkta tann tørv, sum til einahvørja tíð er. Fyri at hetta kann lata seg gera, er sera umráðandi, at greiðar samstarvsavtalur og mannagongdir eru millum teir ymisku myndugleikarnir um at gagnnýta fakliga førleikan hjá hvørjum øðrum. Hetta tí at starvsfólkaorkan við neyðuga serkunnleikanum er avmarkað í Føroyum. Harafturat er neyðugt, at allir myndugleikar, ið hava við børn og ung at gera, hava neyðuga fíggjarliga orku og fullnýta hana á besta hátt, soleiðis at myndugleikarnir kunnu veita ta tænastu og tey tilboð, sum tørvur er á.

Hagtøl eiga at verða fingin til vega, sum kunnu gerast grundarlag undir metingum av framtíðar tørvinum, tað verið seg innan stovns- og viðgerðartilboð, umlætting, fosturheim, ymisk námsfrøðilig stuðulstilboð v.m. Í framhaldi av hesum verður eitt yvirlit gjørt, sum klárt lýsir, hvørji tilboð og skipanir eru, hvør málbólkurin er og hvat endamálið er við

[35] Til dømis frá skúlaverki og SFB, ella skúlaverki, SFB og sjúkrahúsverki.

teimum. Harafturat skulu greiðar mannagongdir vera fyri, hvussu brúk kann gerast av teimum.

### 8.1. Útgreining og uppfylgjandi viðgerð

Sum víst á undir **4.1.** er umráðandi, at børn, ung og familjur við serligum tørvi verða útgreinað, áðrenn ein fyriskipan verður sett í verk. Mett verður, at útgreining av børnum og ungum skal fara fram á einum stað, meðan útgreining av familjum skal fara fram á einum øðrum stað. Tá familjur verða útgreinaðar, er talan um viðkvom foreldur og teirra børn, og tískil mugu umstøðurnar vera hóskandi til endamálið. Harafturat kann vera neyðugt at gera útgreiningina yvir eitt tíðarskeið. Harafturímóti kann útgreining av børnum vanliga gerast ambulant, antin á staðnum, úti á stovnum ella í heiminum. Arbeiðsbólkurin hugsar sær, at fakfólk á hesum øki skipa kanningargongdina sínamillum, her í millum um ein sjúkuavgerð skal takast í mun til einstaka barnið. Tað, sum hevur størsta týdningin er, at fyriskipanir, ið verða settar í verk, hava støði í eini fakligari meting av trupulleikunum, og at tey serkønu saman við teimum, ið eru um einstaka barnið, finna fram til rætta tilboðið.

Í sambandi við útgreining av børnum og ungum er umráðandi, at hugsað verður um barnið í síni heild – bæði skúla, frítíð, útbúgving, viðgerð og heima. Tískil er neyðugt, at tað í útgreiningini verður arbeitt í tvørfakligum toymum, soleiðis at ein heildarætlan kann gerast, ið hevur fyrilit fyri at menna barnið og tann unga á øllum økjum.

### 8.2. Tilboð og skipanir kring landið

Tilboð og skipanir eiga í mest møguligan mun at fara fram í nærumhvørvinum. Um grundarlag ikki er fyri, at tilboðið ella skipanin er í nærumhvørvinum og hvørjum øki, sum verður sett á stovn, mugu økini samstarva. Staðsetingin av tænastunum skal fyrst og fremst vera fakliga og fíggjarliga grundað.

Fakig ráðgeving og vegleiðing, her í millum familjuráðgeving til familjuna og faklig ráðgeving í mun til brekið ella sjúkuavgerðina, eigur í størst møguligan mun at fara fram úti í økinum. Mett verður, at um familjur, umframt skúlar, dagstovnar og onnur, ið arbeiða við børnum og ungum, fáa atgongd til fakliga serkunnleikan, kann hetta verða við til at stuðla og fyribyrgja, at børn og ung fáa so stórar trupulleikar, at tey verða sett heiman.

### 8.3. Stuðulsfólkaskipanin fyri børn (SFB)

Víst hevur verið á, at foreldrini sum heild eru glað fyri skipanina og tey tilboð, skipanin veitir. Tí verður mett, at skipanin skal halda fram, í stóran mun sum higartil. Tó verður mett, at skipanin skal hava stovnar, ið eru bygdir til endamálið, har skipast kann fyri dag- og frítíðartilboði til børn, ið ikki kunnu integrerast í kommunalu ansingarskipanini, og til børn og ung, ið eru farin um aldursmarkið at nýta kommunalu skipanina. Hesir stovnar skulu harumframt hava pláss til, at umlætting[36] kann skipast á stovninum. Á henda hátt verður mett, at raksturin av SFB gerst so skynsamur sum gjørligt.

[36] Sí nærri um umlætting undir pkt. 8.6.

Neyðugt er at gera reglur og vegleiðingar um virksemið hjá SFB, sum áseta, hvørjar veitingar SFB hevur ábyrgdina av at bjóða. Hetta soleiðis, at markamót verða ásett í mun til sektorábyrgdina, og soleiðis at skipanin verður meira gjøgnumskygd og greiða samstundis fæst á ábyrgdarbýtinum millum foreldur og SFB.

Reglurnar skulu gerast í samráð við aðrar myndugleikar fyri at tryggja, at eingin, sum hevur serligan tørv, fer niður ímillum skipanirnar hjá teimum ymisku myndugleikunum.

### 8.4. Fosturforeldraskipanin

Fosturforeldraskipanin er ein vælvirkandi skipan, ið eigur at halda fram.Tó eiga nakrar broytingar at verða gjørdar. Fyri tað fyrsta eigur tað at verða eitt krav í sambandi við góðkenning av fosturforeldrum, at tey skulu luttaka í einum grundskeiði, helst áðrenn tey gerast fosturforeldur. Harumframt eigur tað eisini at vera eitt krav, at fosturforeldur luttaka á teimum fakligu tiltøkum, sum Fosturforeldraskipanin skipar fyri. Hesum kravi um førleika tekur Fosturforeldrafelagið og Gigni undir við.

Vísandi til viðmerkingar frá Fosturforeldrafelagnum og Fosturforeldraskipanini, verður mett, at tørvur er á, at endurskoða umlættingarpartin í Fosturforeldraskipanini. Arbeiðsbólkurin metir, at ein ella fleiri fosturfamiljur eiga at verða settar í starv sum umlættingarfamilja, soleiðis at hesi burturav taka ímóti børnum, sum skulu til umlætting. Umlættingarskipanin í dag fer við nógvari orku frá Fosturforeldraskipanini.

Arbeiðsbólkurin metir eisini, at tá tørvur er á eini bráðfeingis fyriskipan í fosturheimi, eiga ein ella fleiri fosturfamiljur at verða settar í starv sum bráðfeingis fosturfamiljur, soleiðis at nøkur fosturheim altíð eru tøk, tá ið børn skulu bráðfeingis til fosturs. Hesar fosturfamiljur skulu samsýnast serliga fyri hetta. Eisini hesum ynski tekur Fosturforeldrafelagið undir við.

Fosturforeldrafelagið vísir harafturat á, at fosturfamiljur eiga av vera býtt upp í vanlig og styrkt fosturheim, soleiðis at tey hvør í sínum lagi megna sínar serstøku uppgávur. Hetta sær Fosturforeldraskipanin ikki sum nakran trupulleika. Fosturforeldraskipanin og fosturheimini virka væl, sum nú er. Fosturforeldraskipanin metur, at tað ikki verður nakar trupulleiki at gera styrkt fosturheim afturat, um neyðuga orkan verður veitt Fosturforeldraskipanini. Arbeiðsbólkurin tekur undir við hesum.

### 8.5. Samdøgurstilboð

Sum víst á undir **3.1** og **3.2**, hava børn og ung við serligum tørvi ógvuliga ymiskar trupulleikar og eyðkenni. Fleiri av hesum børnum og ungu hava tørv á einum fyribils uppihaldi á einum samdøgursstovni, soleiðis at tey kunnu fáa ta viðgerð, tey hava tørv á. Tískil verður mett, at neyðugt er við hesum tilboðum í Føroyum eftir barnaverndarlógini:

1. Ungdómsdeild (Ungdómsdeildin á Føroya Barnaheimi)
2. Viðgerðardeild við tveimum eindum
3. Verkætlanareind
4. Sosialpsykiatrisk eind
5. Familjudeild

6. Útslúsing og búvenjing til ung um 18 ára aldur, ið ikki eru heilt før fyri at klára seg sjálvi uttan stuðul frá einum vaksnum persóni í gerandisdegnum

Umframt føst pláss á omanfyri nevndu deildum, skulu bráðfeingispláss eisini vera. Deildirnar og bráðfeingisplássini verða lýst niðanfyri.

Harafturat er neyðugt við hesum tilboðum fyri børn og ung við breki, ið eru fevnd av forsorgarlógini:

1. Bú- og umlættingartilboð til børn og ung við fjølbreki
2. Bú- og umlættingartilboð til børn og ung við autismu
3. Bú- og umlættingartilboð til børn og ung við menningartarni
4. Útslúsingar-, búvenjingar- og arbeiðsavkláringartilboð

### 8.5.1. Ungdómsdeild

Ein ungdómsdeild – Ungdómsdeildin á Føroya Barnaheimi – við samdøgurstilboði eigur at vera, ið tekur ímóti ungum við lættari kensluligum og sosialum trupulleikum, sum tó ikki kunnu búgva hjá eini fosturfamilju.

Mett verður, at ungdómsdeildin á Føroya Barnaheimi eigur at verða partur av økinum Børn og Ung.

### 8.5.2. Viðgerðardeild við tveimum eindum

Ásannandi, at øll børn og ung ikki altíð kunnu verða saman, antin orsakað av aldri ella teirra serligu trupulleikum, verður mett, at tað eigur at verða møguleiki fyri at hava tvær viðgerðareindir, sum taka ímóti viðgerðarkrevjandi børnum og ungum, sum ikki rúmast á Ungdómsdeildini.

Hesar viðgerðareindir skulu standa fyri einum skipaðum og "forútsigiligum" gerandisdegi. Harafturat skulu eindirnar skapa ein innihaldsríkan og mennandi gerandisdag fyri barnið og tann unga. Neyðugt er, at eindirnar hava góða starvsfólkanormering, soleiðis at starvsfólk eru um barnið ella tann unga alla tíðina.

Eindirnar skulu hava skúlatilboð knýtt at sær, soleiðis at børnini og tey ungu kunnu fáa undirvísing á staðnum. Tær skulu sostatt hava høli, sum eru hóskandi til undirvísing. Tó skal tað vera skúlamyndugleikarnir, sum hava ábyrgdina av undirvísingini í samsvari við sektorábyrgdina. Fyri nøkur av teimum ungu kann tørvur verða á at fáa avklárað framtíðar útbúgvingarmøguleikar. Eisini hesum skulu skúlamyndugleikarnir taka sær av.

### 8.5.3. Sosialpsykiatrisk eind

Ásannandi at fleiri børn og ung eru, sum hava psykiatriskar trupulleikar, verður mett, at viðgerðardeildin eigur at samstarva við Psykiatriska Depilin um sosialpsykiatriska viðgerð fyri henda aldursbólk. Henda deildin skal taka ímóti ungum við byrjandi persónligheitsórógv, sálarsjúkum ella við einum viðkvæmum persónligheitsstrukturi.

### 8.5.4. Verkætlanareind

Stovnurin skal eisini hava eina verkætlanareind, ið gevur møguleika fyri, at gera eina verkætlan í eitt styttri tíðarskeið fyri tað einstaka barnið ella tann einstaka unga, um hesi eru til skaða fyri seg sjálvan ella onnur, og gerast ov trupul til viðgerðareindina. Eindin skal kunna virka sum ein "tryggjaður stovnur".

### 8.5.5. Bráðfeingispláss

Tað er umráðandi, at bráðfeingispláss altíð eru tøk á samdøgursstovninum.

Um tað ikki er gjørd nøkur útgreining av barninum ella tí unga, áðrenn viðkomandi verður innskrivaður á eitt bráðfeingispláss á samdøgursstovninum, áliggur tað stovninum, í samstarvi við greiningarmiðstøðina, at síggja til, at viðkomandi verður útgreinaður áðrenn tríggir mánaðir eru farnir.

### 8.5.6. Útslúsing

Við útslúsing, eisini kallað eftirvernd, er at skilja, at tann ungi skal hjálpast til eina sjálvstøðuga tilveru.

Eitt útslúsingartilboð eigur altíð at vera til ung, tá tey verða útskrivað frá einum samdøgurstilboði, vanliga um 18 ára aldur. Harafturat kunnu ung við serligum tørvi, sum hava búð heima, hava tørv á einum útslúsingartilboði, í sambandi við at tey flyta heiman. Tað, sum eyðkennir hesi ungu, er, at tey eru ikki heilt før fyri at klára seg sjálvan í gerandisdegnum, uttan stuðul frá einum vaksnum persóni.

Í útslúsingartilboðnum skulu ung fáa búvenjing, sum miðar fram ímóti, at gera tey ungu før fyri at klára seg sjálvi. Um tað eftir eina tíð vísir seg, at tann ungi ikki kemur at klára seg sjálvan, skal starvsfólkið gera frágreiðing um, hvønn tørv tann ungi kemur at hava í framtíðini. Henda frágreiðing skal kunna brúkast til at meta um, hvørt tann ungi kann megna at búgva fyri seg sjálvan við eitt sindur at stuðli, ella viðkomandi hevur tørv á búplássi á einum stovni ella sambýli.

Ungdómar eiga bert at verða innskrivaðir á útslúsingartilboði so leingi viðkomandi mennist, og ikki longri enn tvey ár.

Meðan tann ungi er innskrivaður á útslúsingartilboði, skal avkláring gerast í mun til arbeiðsevni og útbúgvingarmøguleikar. Útslúsingartilboðið skal í samstarvi við myndugleikan, sum hevur innskrivað viðkomandi, samskipa og hava samband við viðkomandi myndugleikar.

### 8.5.7. Familjudeild

Mett verður, at tørvur er á eini familjudeild, ið skal veita familjuviðgerð, sum m.a. styrkja foreldraførleika, umframt sálarfrøðiligar samrøður við foreldur og børn. Familjudeildin skal bjóða viðgerðina bæði sum samdøgurs- og dagtilboð. Dagviðgerðin skal, umframt at fara fram á familjudeildini, eisini bjóðast úti í økinum. Í hesum sambandi má greitt ásetast, hvør viðgerð kann fara fram úti í økinum og hvør kann fara fram á Familjudeildini.

Eisini skal familjudeildin hava bráðfeingispláss til nýføðingar, smábørn og minni børn, um hesi eru so illa fyri, at tey ikki kunnu vera hjá eini fosturfamilju.

Harumframt skal familjudeildini móttaka foreldur og børn, sum skulu hava samveru undir eftirliti. Starvsfólkið á familjudeildini kunnu tá, við sínum serkunnleika, hjálpa foreldrunum at skapa eina góða samveru við børnum teirra.

## 8.6. Umlætting

Tað er neyðugt, at umlættingartilboð eru til foreldur at børnum og ungum við serligum tørvi. Serliga foreldur at fjølbrekaðum, menningartarnaðum og ávísum børnum og ungum við autismu hava stóran tørv á skipaðari umlætting, um tey skulu hava neyðugu orkuna at hava børnini búgvandi heima sum longst.

Tørvur er á at økja um og umskipa umlættingartilboðini. Hetta verður gjørt mest skynsamt við, at ein homogenur bólkur fær eina skipaða umlætting á ávísum staði. Umlættingin er løgd til rættis soleiðis, at foreldrini vita, hvørji vikuskifti í inniverandi ári teirra barn er til umlætting. Við hesum verður hugsað um at veita børnunum eina innihaldsliga góða umlætting og at veita foreldrunum eina hvíld frá fríggjadegi seinnapart til mánamorgun.

Tað eru serliga tveir bólkar av børnum og ungum, ið bera brek, sum hava stóran tørv á umlætting. Hettar eru børn og ung, ið hava fjølbrek, og børn og ung, ið hava autismu. Harafturat eru tað børn og ung við ADHD og menningartarni, ið hava tørv á umlætting. Børn við ADHD er ein vaksandi bólkur, ið krevur nógva umlætting.

Hagtølini niðanfyri vísa, hvussu nógvir brúkarar eru í SFB við fjølbreki, menningartarni og ADHD/Autismu/o.l. í aldrinum 7 – 17 ár:




| | Ár 2006 | ár 2007 | ár 2008 | ár 2009 |
|---|---|---|---|---|
| Fjølbrek | 16 | 19 | 19 | 19 |
| ADHD/autisma/o.l. | 15 | 24 | 29 | 39 |
| Menningartarn | 25 | 25 | 22 | 25 |

### 8.6.1. Bú- og umlættingartilboð til børn og ung við autismu

SFB veitir í dag skipaða umlætting til børn og ung við autismu. Fýra bólkar av børnum og ungum við autismu verða umlætt í Ovarugøtu 46. Flestu av teimum fáa umlætting eitt vikuskifti um mánaðin og einstøk hava tørv á tveimum vikuskiftum um mánaðin. Tørvurin verður mettur eftir, hvussu krevjandi børnini eru at hava búgvandi heima. Ovaragøta 46

verður eisini nýtt ad hoc til umlætting gerandisdagar, summarumlætting og til dagtoymi gerandisdagar.

Harafturat hava foreldur at børnum og ungum við autismu møguleika at fáa umlætting á stovninum Kelduskákið í Klaksvík.

Mett verður, at tá ið børn og ung hava tørv á umlætting trý vikuskifti um mánaðin, frítíðartilboði hjá SFB seinnapartar gerandisdagar, frítíðartilboði um dagin, tá ið skúlin er stongdur og tvær til tríggjar vikur summarferiuumlætting, er búpláss tað næsta tilboð, ið eigur at standa foreldrum í boði. Tó kunnu vera aðrar umstøður í familjuni, ið gera, at foreldur hava tørv á búplássi til barnið.

Mett verður, at innanfyri komandi trý árini verður tørvur á einum stovni við minst 10 nýggjum bú- og umlættingarplássum til børn og ung við autismu. Sum hagtølini niðanfyri vísa, eru 28 brúkarar í SFB í 2009 við sjúkuavgerðini autisma í aldursbólkinum 7 – 17 ár.




Viðmerkjast skal, at børn og ung eru í skipanini, sum ikki hava fingið staðfest sjúkuavgerðina autismu, men sum hava líknandi eyðkenni. Hesi eru ikki tikin við í uppgerðina.

### 8.6.2. Bú- og umlættingartilboð til børn við fjølbreki

Tey børn og ung við fjølbreki, ið SFB veitir umlætting til, fáa øll umlætting í privatum heimum; hetta tí at SFB ikki hevur egnaði hølir til at gera eina skipaðað umlætting. Tó verður dagstovnurin Reiðrið í Saltnesi partvís nýtt sum umlættingarstaður.

Flestu børn og ung við fjølbreki fáa umlætting eitt vikuskifti um mánaðin, tó fáa einstøk tvey umlættingarvikuskifti.

Umlætting í privatum heimum er ein sera kostnaðarmikil fyriskipan, ið gerst enn dýrari, tá ið børnini gerast tannáringar. Hetta tí, at tá er neyðugt, at tvey starvsfólk eru um barnið, tá ið tað skal flytast, vaskast o.s.fr.[37] Eisini gerst umlætting av fjølbrekaðum ómøgulig í privatum heimi, tí barnið og hjálpitólini hjá tí  taka meira pláss, umframt at tvey fólk skulu vera um barnið, tá ið tað skal flytast, vaskast o.s.fr..

[37] Havast skal í huga, at starvsfólkini eru sáttmálasett og fáa løn sum ásett í sáttmála.

Hesi børn og ungu eru veikastu brúkararnir í SFB og tann bólkurin, ið uppá seg krevur flest starvsfólk. Foreldur at hesum børnum eru sera tengd at veitingum frá SFB í gerandisdegnum. Mett verður, at tørvur er á, at stovnur verður bygdur til børn og ung við fjølbreki, ið kann veita alla neyðuga umlætting. Harafturat skal stovnurin hava búpláss, umframt pláss til dagtoymi til 8 fólk. Ætlandi kunnu børn og ung við menningartarni eisini fáa bú- og umlættingpláss saman við børnum og ungum við fjølbreki.

Mett verður, at bráðfeingis tørvur er á einum nýggjum bú- og umlættingarstovni fyri 15-20 børnum og ungum við fjølbreki og menningartarni. Sum hagtølini niðanfyri vísa, eru 19 brúkarar í SFB í 2009 við fjølbreki í aldursbólkinum 7 – 17 ár:




Víst hevur verið á, at bráðfeingis umlættingarpláss mugu vera tøk, tí tað kunnu brádliga íkoma støður, sum gera, at foreldrini ikki kunnu taka sær av barninum ella tí unga, ið er soleiðis fyri, at onnur ikki kunnu ansa viðkomandi. Mett verður, at til ber at skipa fyri bráfangis umlættingarpássum í sambandi við skipaðu umlættingina.

Neyðugt er at gera vegleiðing um umlætting, í mun til aldur og brek.

### 8.7. Búpláss til børn við serligum tørvi

Vanliga hava børn og ung undir 18 ár ikki sjálvstøðugan bústað. Av somu orsøk eru flest øll búfólkini á bústovnunum og sambýlunum, sum Nærverkið umsitur, 18 ár ella eldri[38].

Ásannast má tó, at ung, sum eru fjølbrekað, menningartarnað ella børn og ung við autismu, oftani hava tørv á búplássi frá tí at hesi eru um 12 – 14 ára aldur. Í løtuni eru 2 børn og ung á bíðilista til búpláss hjá Trivnaðartænastuni á Nærverkinum[39]. Mett verður tó, at fleiri eru, sum hava tørv á búplássi, men ikki hava søkt, tí so fá búpláss eru til børn og ung.

Sum víst var á í **8.6.1.** og **8.6.2.**, vísir tørvurin á umfatandi umlætting á, at framtíðar tørvur er á 10 bú- og umlættingarplássum til børn og ung við autismu og at tørvur í dag er fyri minst 10 bú- og umlættingarplássum til børn og ung við fjølbreki og menningartarni.

---

[38] Tveir ungdómar undir 18 ár hava tó búpláss á einum stovni undir Nærverkinum.

[39] Harumframt eru áleið 30 vaksin á bíðilistanum.

Eisini eigur fyrisitandi myndugleikin at hava tørvin á stovnsplássum til hesi børn og ungu í geyma, tá tey gerast vaksin.

### 8.7.1. Útslúsingar-, bú- og arbeiðsavkláringartilboð[40]

Almannastovan skal í góðari tíð áðrenn brúkari, ið er undir forsorgarlógini, gerst 18 ár, t.v.s. í minsta lagi eitt ár frammanundan, taka málið upp til nýggja heildarviðgerð um framtíðarútlitini hjá brúkaranum. Mett skal verða um, hvørt brúkarin skal hava eitt útslúsingar-, bú- og arbeiðsavklárandi tilboð, ella um brúkarin hevur tørv á bú- og/ella verkstaðstilboði hjá Nærverkinum.

Stovnurin Rásin, ið tekur næmingar við menningartarni inn, sum Mentamálaráðið varar av, virkar á sama øki. Tørvur er á at økja um virksemið, so Rásin kann taka næmingar inn hvørt ár, umframt at mælt verður til at umhugsa, hvørt tilboðið, ið Rásin veitir, ikki náttúrliga hoyrir heima innan økið Børn og Ung. Í sínum viðmerkingum til álitið ger Javni greitt, at tey ungu eiga at vera stimbrað í at liva eitt virkið og sjálvstøðugt lív og at verða tikið við í samfelagið. Eisini eigur arbeiðsvenjing og útslúsing til arbeiðsmarknaðinum eisini at verða havd í huga í hesum høpi.

Somuleiðis eigur leikluturin hjá Dugna at verða umhugsaður, so teirra royndir við at veita arbeiðsavklárandi tilboð eisini kundi komi ungum við serligum tørvi til góðar. Í serstakum førum fáa ung við serligum tørvi arbeiðsavklárandi tilboð í Danmark – tilboð, sum vit eins væl kundu veitt í Føroyum. Í sínum hoyringssvari, dagfest 22. februar, hevur Dugni tikið undir við hesum, og er sinnað at veita arbeiðsavklárandi tilboð og skúlatilboð til ung undir 18 ár, treytað av, at høli eru tøk til endamálið og at fígging verður fingið til vega.

## 8.8. Ráðgeving til familjur at børnum við serligum tørvi

Familjur at børnum við serligum tørvi hava ein serligan tørv á ráðgeving, t.d. í sambandi við at barn við breki verður borið í heim, sjúku hjá barni, breki hjá barni, uppaling, við deyða hjá barni og aðrar hendingar í familjuni. Sum lýst í **4.2.2.** arbeiðir Nærverkið í løtuni við at skipa Familjudepilin soleiðis, at hann m.a. kann veita ráðgeving á hesum økinum. Somuleiðis leggur endamálið hjá SND og Gigni upp til at veita somu tænastu – í seinna førinum er uppgávan lógarásett[41]. Umráðandi er, at greiða verður fingin á, hvussu hendan ráðgevingin verður veitt og hvør myndugleiki eigur uppgávuna.

## 8.9. Stovnsuppihald uttanlands

Ásannandi, at tað helst altíð fara at verða nøkur børn og ung, sum hava ein so heilt serligan tørv, at hesin ikki kann nøktast í Føroyum, eigur møguleiki at verða fyri at senda tey uttanlands, bæði eftir forsorgarlógini og barnaverndarlógini.

## 8.10. Visitatión

Mett verður, at tørvur er á eini visitatiónsskipan, sum skal tryggja, at børn og ung við serligum tørvi altíð fáa rætta viðgerðartilboðið. Samstundis eigur visitatiónsskipanin at seta

[40] Sí eisini pkt. 8.6.10.
[41] Sí Løgtingslóg nr 63 frá 2005.

krøv og taka fyrilit fyri okkara viðgerðarstovnum og orku teirra. Endmálið er at fremja samstarv og at gagnnýta tilfeingið í Føroyum so javnt, sum til ber. Hetta eigur at verða gjørt á tann hátt, at ein nevnd verður sett saman av stovnsleiðarunum, umboðum fyri barnaverndartænastuna í hvørjum einstøkum føri, og møguliga eisini onnur barna- og ungdómsserkøn fólk. Tá ynski eru um fyriskipanir uttanlands, eigur nevndin altíð at meta um, hvørt møguleikarnir fyri viðgerðum í Føroyum frammanundan eru troyttir til fulnar.

# 9. Hvussu skipa vit tilboð og skipanir í framtíðini

Arbeiðsbólkurin er av teirri fatan, at tilboð og skipanir til børn, ung og familjur við serligum tørvi kunnu skipast skynsamari enn tey eru í dag, og verður hetta lýst niðanfyri.

## 9.1. Brek- og barnavernd í einum felags høpi

Tað verður mett at hava stórar fyrimunir, at øll mál, har endamálið er at menna og stimbra børn og ung, verða samhugsað. Hetta ger seg bæði galdandi, tá talan er um dagligu umsitingina og tá skipað verður fyri mennandi viðgerðar- og stovnstilboðum, hvørt talan so er um sjónarhornið í barnaverndarhøpi ella við atliti at børnum og ungum, ið bera brek. Tey, ið arbeiða við børnum og ungum kunnu í felag nýta sínar serligu førleikar, so hetta virkisøki verður ment enn meira í síni heild.

Ofta verður víst á, at markamót og gráøki eru stórir bágar í dagliga arbeiðinum, og forða fyri skjótum og munagóðum fyriskipanum. Um brek- og barnaverndarmál verða umsitin av kommunalum eindum kring landið, metir arbeiðsbólkurin, at gráøkini gerast færri, soleiðis at tænasturnar bæði gerast dyggari og at tilfeingið verður fullnýtt. Somuleiðis eiga serstovna- og trivnaðartilboðini at verða skipað í felagskommunalum høpi, ið sum frá líður verða rikin í felag.

Einki er til hindurs fyri at samskipa tilboð og skipanir, sum hvør í sínum lagi hava heimild í forsorgarlógini og barnaverndarlógini. Tó er neyðugt at tillaga endamálsorðingina, eins og at tað klárt má koma fram, hvørji viðurskifti gera seg galdandi í mun til tey einstøku tilboðini. Orsøkin til hetta er, at endamálið við tilboðunum ikki altíð er tað sama, tá tosað verður um ávikavist brek- og barnaverndarmál.

## 9.2. Eitt stað at venda sær til

Í dag skulu familjur ella onnur, alt eftir hvør trupulleikin er, venda sær til antin sosialu deild á kommununi, barnaverndartænastuna, Almannastovuna, Sernámsdepilin, her í millum NSR-tænastuna, ella heilsufrøðingarnar hjá Gigni fyri at fáa hjálp.

Vísandi til, at atfinningar hava verið um, at tað er trupult hjá familjum við serligum tørvi at vita, hvar tey skulu venda sær við sínum trupulleikum, og at familjan má venda sær til fleiri myndugleikar, eigur meginreglan um “eina hurð” til tað almenna at verða sett í verk innan økið børn og ung. Hurðin eigur at verða so nær borgaranum sum møguligt.

Kommunurnar hava longu í dag sosialar deildir og barnaverndartænastur, og harafturat umsita tær dagstovnaøkið. Tær eru sostatt partur í flestu málum um børn og ung við serligum tørvi. Tá hugsað verður um, at kommunurnar eru nær borgaranum, verður hildið, at staðið har borgarin skal venda sær til, tá talan er um børn, ung og familjur við serligum tørvi, er hjá kommununi. Tó verður neyðugt at samskipa kommunalu deildirnar við aðrar myndugleikarnar á økinum.

Arbeiðsbólkurin mælir í fyrstu syftu til at virka miðvíst fyri, at tær ymsu tænasturnar, ið arbeiða við børnum og ungum: NSR-tænasturnar, Gigni, Stuðulsfólkaskipanin fyri børn, barnaansing og barnaverndartænastur, koma at halda til undir sama taki. Neyðugt er harafturat, at tænasturnar samstarva við økisdeildirnar hjá Almannastovuni.

Arbeiðsbólkurin hugsar sær, at NSR-tænasturnar og Gigni í øðrum lagi verða lagdar til kommunala myndugleikan at umsita. Hetta er tó ein spurningur, ið avvarðandi myndugleikar mugu taka upp til nærri viðgerð. Kommunurnar ávísa og gjalda longu í dag høli til hesar skipanir, umframt at rinda fyri skrivara og annan rakstur hjá NSR. Í sínum hoyringssvari ger Gigni tó vart við, at hesin stovnur ikki sær fyrimunir í, at verða lagdur til kommunurnar at umsita, hóast tikið verður undir við hugtakinum um “eina felags hurð” fyri tær tænastur, sum arbeiða við børnum og ungum.

Óansæð hvør av hesum báðum møguleikum verður valdur, verður mett rættast, at ein felags tænasta er fyrsta hurðin inn til myndugleikarnar. Ein felags móttøka tryggjar, at málið kemur á rætta stað og verður viðgjørd av fakfólki. Tá ymisku tænasturnar eru undir sama taki og undir sama myndugleika eru størstu forðingarnar fyri tvørfakligum samstarvi tiknar burtur.

Arbeiðsbólkurin staðfestir, at flestu av hoyringspørtunum taka undir við sjónarmiðinum um eina felags hurð fyri tænasturnar, sum virka fyri børnum og ungum. Tó er ein ávís ósemja um, hvussu samstarvið millum hesar tænastur ítøkiliga skal skipast, og hvør skal hava samskipandi leiklutin.

Við samskipanini verður ábyrgdin savnað á einum stað, umframt at hvørt kommunalt øki hevur eitt tvørfaklig toymi, ið kann seta inn tvørfakliga, so skjótt og so nær borgaranum sum gjørligt. Eisini eigur hetta at hava við sær, at skiftið millum eitt nú dagstovn og skúla, umframt skúla og ungdómstilveru gerst smidligari.

## 9.3. Ráðgeving og vegleiðing

Mett verður, at ráðgeving og vegleiðing í størst møguligan mun eigur at fara fram so nær borgaranum sum gjørligt, hetta bæði í mun til sernáms-, heilsu- og sálarfrøði.

Henda ráðgeving og vegleiðing verður í dag veitt í ávísan mun úti í økinum, av heilsufrøðingunum og NSR-tænastuni.

Sambært heimasíðuni[42] hjá Gigni skulu heilsufrøðingarnir eygleiða og kanna barnið. Harafturat skulu heilsufrøðingarnir m.a. ráðgeva og vegleiða foreldrini um sálarligu,

[42] Hin 12. januar 2010

sosialu og likamligu menningina hjá barninum, eins og heilsufrøðingarnir skulu ráðgeva um foreldraleiklut og –tilknýti. Mentamálaráðið ger í sínum hoyringssvari vart við, at ráðgevingin eigur at verða gjørd í samstarvi við skúla og dagstovnar, og at sernámsfrøðiligir og námsfrøðiligir ráðgevar verða knýttir at hesi uppgávuni.

Sambært Mentamálaráðnum er endamálið við NSR-tænastuni at veita eina tænastu til børn við serligum tørvi og familjum teirra, hetta m.a. við at gera eina undirvísingar- og heildarætlan fyri barnið og at ráðgeva foreldrum, stovnum, skúlum o.ø.

Mett verður, at við at samskipa NSR-tænasturnar og heilsufrøðingarnar við kommunalu deildirnar, og har við skapa tvørfaklig toymi úti í kommununum, verða fakligu førleikar hesum gagnnýttir betri, eins og foreldur, børn og ung fáa eina munadyggari ráðgeving og vegleiðing.

### 9.4. Kommunalu økini

Í sambandi við støddina á barnaverndarøkjunum verður mett, at fleiri av núverandi økjum eru ov smá. Trupulleikin við smáum økjum er, at vandi er fyri, at barnaverndarmálini kunnu gerast persónlig, umframt at trupult kann verða at fáa starvsfólk við neyðuga fakliga førleikanum til økið; her verður ikki bert hugsað um málsviðgerar til barnaverndartænasturnar, men eisini onnur fakfólk, t.d. sálarfrøðingar, familjuráðgevar, námsfrøðingar og onnur, sum tørvur kann verða á í sambandi við fyribyrgjandi fyriskipanir.

Mett verður samstundis, at fakligi førleikin mennist, um økini gerast størri, tí so má roknast við, at fleiri starvsfólk verða og at hesi kunnu ráðføra seg við hvønn annan.

Arbeiðsbólkurin tekur til eftirtektar, at tað í kommunuálitinum[43] verður mælt til, at ásetingin í barnaverndarlógini um tvungin kommunal samstørv um barnaverndartænastur, eiga at verða tillagað nýggja kommunala bygnaðinum.

### 9.5. Útgreining

Ein væl virkandi útgreiningarmiðstøð skal vera fyri alt landið, ið hevur ábyrgd av at útgreina børn og ung við serligum tørvi og at gera eina heildarætlan fyri barnið ella tann unga. Í heildarætlanini skal tilmæli vera um, hvørjar fyriskipanir skulu setast í verk, her í millum møguligar viðgerðir.

Tann tvørfakligi serkunnleikin at útgreina børn og ung við serligum tørvi, umframt undirvísa, ráðgeva og vegleiða í mun til hesi, er í dag á Sernámsdeplinum (SND) og Psykiatriska deplinum.

Útgreiðingarmiðstøðin eigur vera ein stovnur undir landinum fyri at tryggja, at tann, ið varar av útgreiningini, er óheftur av tí myndugleika, ið veitir tilboðið til øll børn og ung í Føroyum.

[43] Kommunur, eindir og uppgávur 2009.

Mett verður, at kanningar av foreldraførleikanum eiga at fara fram á eini familjudeild. Hendan skal hava ábyrgdina av at gera námsfrøðiligar eygleiðingar av gerandisdegnum hjá familjuni, sálarfrøðiligar kanningar av foreldrum og børnum, umframt sambandinum teirra millum. Harafturat verður ein heildarætlan gjørd fyri familjuna. Í heildarætlanini skal tilmæli vera um, hvørjar fyriskipanir skulu setast í verk, m.a. um barnið skal setast heiman.

Eygleiðingarnar og ráðgeving í sambandi við kanning av familjuni kunnu fara fram antin í heiminum hjá familjuni ella á Familjudeildini. Tað er í hesum sambandi umráðandi, at tað er eitt skipað samstarv millum greiningarmiðstøðina og familjudeildina, og at hendan hevur atgongd til fakliga serkunnleikan á greiningarmiðstøðini, tá tørvur er á tí, soleiðis at ein heildarætlan kann gerast fyri familjuna.

Familjur at børnum við breki hava stóran tørv á sálarfrøðiligari-, familju- og námsfrøðiligari ráðgeving. Vanliga eigur hendan ráðgeving at fara fram úti í økinum. Tó eigur ein familja við barni, sum ber brek, at kunna fáa ráðgeving ella innskrivast á Familjudepilin, um serligur tørvur er á tí.

Ætlanin um eina greiningarmiðstøð er førd fram í samgonguskjalinum hjá sitandi landsstýri. Flestu av hoyringspørtunum meta hetta vera eitt gott hugskot. Vísast skal tó á, at serkøn innan økið – Sernámsdepilin og Psykiatriski depilin – óttast fyri eini spjaðing av fakfólki, sum frammanundan eru rættiliga fáment. Eisini verður nevnt, at hesir báðir stovnarnir, ið eru ætlaðir at veita greiningarmiðstøðini tænastur, liggja undir hvør sínum aðalráði. Við hesum kunnu ivamálini gerast mong, hvør tekur ábyrgd í hvørjum einstøkum føri, eins og hvussu tilfeingið verður gagnnýtt í gerandisdegnum. Sernámsdepilin vísir á, at fakliga rákið í dag er, at hjálparfyriskipanir í allar flestu førum kunna setast inn uttan stórvegis útgreinan. Heldur vilja tey menna eina *refleksiva interventiónsstrategi*, sum bæði setir fyriskipanir í verk og metir um støðuna so hvørt.

Arbeiðsbólkurin er tó sannførdur um, at ein faklig staðfesting av trupulleikunum hjá børnum og ungum við serligum tørvi er neyðug. Hetta fyri at tey, ið skulu veita hesum børnum og ungu hjálp, fáa amboð at arbeiða við, eins og foreldur og nærumhvørvið annars fær greiðu á, hvussu gerandisdagurin so hvørt eigur at verða skipaður fyri at fáa eina mennandi tilgongd í hvørjum einstøkum føri.

## 9.6. Fosturforeldraskipanin

Arbeiðsbólkurin er av teirri fatan, at Fosturforeldraskipanin fyrisitingarliga eigur at verða undir sama myndugleika sum stovnarnir. Á henda hátt vilja skipanirnar stuðla upp undir hvørja aðra, umframt at stovnsøkið støðugt vil verða tillagað tørvinum.

Síðani Fosturforeldraskipanin varð sett á stovn, hevur hon sum heild virkað væl. Tað hevur verið sera gott fyri barnaverndartænasturnar, at sami myndugleiki hevur havt ábyrgdina av barnaverndartænastunum og Fosturforeldraskipanini. Fosturforeldraskipanin hevur í gerandisdegnum eitt sera tætt samstarv við barnaverndartænasturnar og fosturforeldur, sum ger, at uppgávan at seta eitt barn til fosturs, í flestu førum verða loyst smidligt og nøktandi. Eisini er tað lætt hjá Fosturforeldraskipanin til eina og hvørja tíð at tillaga seg eftir tørvinum hjá barnaverndartænastunum. At stovnarnir undir barnaverndarlógini eisini verða

lagdir undir sama myndugleika sum fosturforeldraskipanin, vildi sjálvandi gjørt skipanina enn meira smidliga. Skipanirnar kundu soleiðis samstarvað lættari um bestu loysnina fyri barnið.

## 9.7. Samdøgurstilboðini

Ásannast má, at fíggjarligur møguleiki er ikki fyri at hava ein stovn fyri hvørt eyðkenni. Tískil er í ávísan mun neyðugt, at børn og ung við ymiskum trupulleikum/eyðkennum eru saman. Mett verður, at hetta kann lata seg gera á forsvarligan hátt, um neyðugi fakligi førleikin og hølisviðurskiftini eru nøktandi. Harafturat má stovnurin hava atgongd til serligan fakligan førleika hjá øðrum myndugleikum, eitt nú heilsuverkinum og skúlaverkinum, ið kann hjálpa stovninum at loysa ta uppgávu stovnurin hevur, í mun til tað einstaka barnið. Tað er eyðsæð, at hesir stovnar mugu hava neyðugu orkuna, fyri at kunna veita hesa tænastuna til samdøgurstilboðini.

Orsakað av, at tørvurin er skiftandi, verður mett neyðugt, at samdøgurstilboðini verða skipað soleiðis, at tey kunnu laga seg til tann tørv, sum til eina hvørja tíð er. Harafturat verður mett, at samdøgurstilboðini ikki skulu skilmarkast ov neyvt, tí hetta má roknast við at skapa fløskuhálsar ella bíðitíð til ávís stovnspláss.

Arbeiðsbólkurin er av tí fatan, at tað er av stórum týdningi, at økið alla tíðina lagar seg eftir tørvinum á tilboðum til børn, ung og familjur í Føroyum. Samstundis skal økið vera við til at menna viðgerðirnar/tilboðini til børnini, tey ungu og familjurnar, so tey eru nøktandi, hóskandi og dagførd í mun til tann tørv, ið kann stinga seg upp.

Hetta setur nógv ymisk krøv til starvsfólkið á økinum, bæði í mun til smidligheit og fakligheit, og tí er tað av alstórum týdningi, at samansetingin av starvsfólkunum á økinum er fjølbroytt - innan sosial-, heilsu- og námsfrøði, har tvørfakligt samstarv er í hásæti.

Mett verður tískil, at rættast er, at tað verður **ein** samdøgursstovnur, men at hesin hevur ymiskar deildir. Hetta fyri at tryggja, at tann fakligi førleikin kann brúkast á øllum deildum, umframt at tryggja, at stovnurin kann tillaga seg tann aktuella tørvin, her í millum at børnini ella tey ungu, kunnu flyta millum deildirnar so hvørt sum tey mennast. Tað er tó umráðandi at møgulig flyting millum deildirnar verður skipað soleiðis, at hetta ikki hevur afturstig í menningini hjá barninum ella tí unga við sær.

Í sínum hoyringssvari, dagfest 5. mars 2010, sigur stýrið fyri Føroya Barnaheim seg ikki kunna taka undir við einum slíkum leisti. Starvsfólkini á ungdómsdeildini hava somu fatan. Ótti er fyri, at ein umskipan fer at hava eina neiliga ávirkan á tað tilboð, sum ungdómsdeildin veitir í løtuni.

Arbeiðsbólkurin heldur tó, at hóast talan er um **ein** samdøgursstovn, kunnu deildirnar, har tað verður mett skilagott, liggja hvør sær, eisini í ymiskum støðum í landinum. Tað sum er umráðandi er, at staðsetingin hjá teimum ymisku deildunum er fakliga grundgivin. Í hesum sambandi skal viðmerkjast, at víst hevur verið á, at samdøgurstilboð eisini eiga at verða uttanfyri Tórshavn. Foreldur uttanfyri Tórshavn kenna seg tryggari, um børnini eru á samdøgurstilboði uttanfyri Tórshavn, tá talan er um ungdómar við stórum atferðar- og

misnýtslutrupulleikum. Harafturat vil eitt samdøgurstilboð uttanfyri Tórshavn geva børnum og ungum haðani, møguleika at koma í eitt annað umhvørvi.

Gjørt skal verða vart við, at hølisviðurskiftini mugu vera í lagi og bygd til endamálið. Í sambandi við eina slíka tilgongd verða starvsfólk og sakkøn fólk annars tikin uppá ráð.

Tá tey, sum í løtuni fáa viðgerð í Føroyum og uttanlands verða tald saman, verður mett, at tørvur í miðal er á umleið 20 plássum við viðgerðar- og skúlatilboðum innan hetta økið. Hagtølini fyri 2009 vísa, at tjúgu børn og ung vóru innskrivað á samdøgursstovn í Føroyum, meðan átjan vóru uttanlands eftir forsorgarlógini og barnaverndarlógini.




Øll ung sum eru á samdøgursstovni uttanlands, fáa eitt heildartilboð. Talvan niðanfyri vísir, hvat innihaldið er í tilboðnum hjá teimum, umframt sosialpedagogiska viðgerð.




Skúli er antin fólkaskúli ella annar fyrireikandi skúli.

## 9.8. Samdøgursstovn uttanlands

Tá onki nøktandi viðgerðartilboð er at finna í Føroyum, verður eisini í framtíðini neyðugt at leita sær uttanlands. Tað er umráðandi, at sami myndugleiki, sum varðar av stovnstilboðunum, hevur ábyrgd av at avseta játtan og at taka avgerð í slíkum førum.

### 9.9. Dag- og umlættingartoymi

Mett verður, at dagtilboð til børn, ið ikki kunnu integrerast í kommunalu skipanini, og frítíðartilboð til børn, ið eru ov gomul til at brúka kommunalar stovnar, fyrisitingarliga eiga at liggja undir SFB. SFB samskipar stuðulin í hóskandi toymi, alt eftir breki, ymsastaðni í landinum. Hølini hjá toymunum skulu eisini kunna nýtast til umlætting í vikuskiftunum.

### 9.10. Dag- og umlættingarstovnar

Dag- og umlættingartilboð verða í dag veitt á Frítíðarheiminum í Skrivaragøtu, Dáanum og Kelduskákinum, ið hoyra undir Nærverkið. Mett verður, at Børn og Ung framyvir eigur at skipa fyri hesum tilboðum, ið fevna um børn og ung upp til 18 ár. Javni ger sínum viðmerkingum frá 4. mars 2010 m.a. vart við, at stórur tørvur er á nýggjum bú- og umlættingarplássum til børn og ung við autismu, hóast Kelduskákið letur upp 1. apríl 2010.

### 9.11. Stuðulsfólkaskipanin fyri børn (SFB)

Vísandi til **9.1.** verður mett, at SFB eigur at liggja undir somu leiðslu sum samdøgurstilboðini.

### 9.12. Búpláss til børn og ung undir 18 ár

Sum víst á undir **8.8.** er tørvur á búplássum til børn og ung undir 18 ár.

Mett verður, at hesir stovnar fyrisitingarliga eiga at liggja undir Børn og ung. Tað er umráðandi, at øll tilboð og skipanir til børn og ung upp til 18/21 ár eru undir sama myndugleika ella stovni.

Børn og ung við fjølbreki er ein sera viðkvæmur bólkur. Børnini eru sera veik og hava í nógvum førum vánalig útlit fyri einum longum lívsskeiði. SFB mælir til, at ein nýggjur landsstovnur skal hava ábyrgdina av øllum hesum bólki, t.v.s. viðvíkjandi dagtoymi, umlætting, stovnspláss, umsiting av heimabúgvandi børnum og stuðlum. Ætlanin er, at hesin stovnur verður bygdur í Eysturoy. Harumframt verður eisini neyðugt við einum dagtoymi í Tórshavn. Ætlanin við hesum nýggja stovni er eisini at veita umlætting til menningartarnað børn.

Bólkurin av børnum við fjølbreki plagar vanliga at liggja um 20-25 børn. Júst nú eru tilsamans 19 fjølbrekað børn í Føroyum.

### 9.13. Fyrisitingin av fosturforeldraskipanini, samdøgurstilboðunum og SFB.

Sum víst á undir **9.1.**, **9.6.** og **9.11.** verður mett, at fosturforeldraskipanin, samdøgurstilboðini og SFB fyrisitingarliga skulu verða undir sama myndugleika og hava eina felags leiðslu. Hetta fyri at serligir fakligir førleikar skulu kunna brúkast til øll tilboðini, umframt at tilboðini kunnu samskipast so skynsamt sum møguligt og tillaga seg tí aktuella tørvinum.

Arbeiðsbólkurin er tískil av tí fatan, at tað skal skipast ein sjálvstøðugur fyrisitingarligur stovnur, ið skal umsita tilboðini.

Harumframt skal stovnurin hava til uppgávu at gera hagtøl, ið m.a. skulu kunna útgreina tørvin og skipa fyri menning og granskingarverkætlanum innan økið.

## 10. Útlegging til kommunurnar – fyrimunir og vansar

Arbeiðsbólkurin er samdur um, at økið eigur at verða lagt út til kommunurnar í síni heild. Tá SFB verður lagt út til kommunurnar at umsita, hava kommunurnar ábyrgdina av allari ansingarskipanini, t.v.s. bæði fyri børn, sum kunnu integrerast á kommunalan dagstovn ella dagrøkt, og børn, sum ikki kunnu integrerast. Harvið hvørva markamótstrupulleikarnir millum kommunu og land, tá talan er um ansingartilboð. Hesir markamótstrupulleikar kunnu tó eisini loysast við at gera broytingar í dagstovnalógini og forsorgarlógini soleiðis, at kommunan fær ábyrgd av at veita *øllum* børnum tilboð um pláss á dagstovni ella dagrøkt, eisini børnum við heilt serligum tørvi.

Harafturat vildi ábyrgdin av at fylgja børnum, sum eru í kommunalari ansingarskipan til viðgerð, venjing v.m. verið hjá kommununi.

Harafturímóti má roknast við, at yvirgongdin frá barna- til vaksnamannatilveruna kann gerast nakað stirvin, tí flytast skal frá einum myndugleika til annan.

Harafturat verður neyðugt við serligum samstarvi millum kommunurnar og Almanna-stovuna í mun til aðrar veitingar eftir forsorgarlógini, eitt nú § 17, stk. 3 um inntøkumiss, § 18, stk. 7 um hjálparráð, v.m.

Kommunurnar kenna, hvør tørvurin er á samdøgurstilboðum. Tískil átti tað at verið lættari at tillaga tilboðini eftir tørvinum, um hesi blivu løgd út til kommunurnar at umsita. Um samdøgurstilboðini verða løgd út til kommunurnar at umsita, hvørvur óbeinleiðis eftirlitið, sum er í dag við samdøgurstilboðunum, har kommunurnar hava verið fyrivarnar í mun til tilboðini hjá landinum. Tá kommunurnar sjálvar umsita tilboðini, vilja tær ikki boða Almannamálaráðnum frá, um tær meta at umstøðurnar ikki eru í lagi. Tískil vil hetta krevja, at fólk, ið ikki hevur tilknýti til kommunurnar, verður sett til burturav at hava eftirlit við tilboðunum.

Arbeiðsbólkurin er av tí fatan, at um nakað skal flytast út til kommunurnar at umsita, so skal **alt** flytast út, t.e. bæði SFB og samdøgurstilboðini. Hetta fyri at sleppa undan, at markamóts- og gráøkistrupulleikum í mun til, nær ein er fevndur av einum tilboði, sum kommunurnar umsita og einum, sum landið umsitur.

Harafturat heldur arbeiðsbólkurin, at um økið verður útlagt til kommunurnar, so skulu kommunurnar eisini hava ábyrgdina, her í millum fíggjarligu ábyrgdina, tá einki nøktandi tilboð er í Føroyum, og børn og ung tískil mugu sendast av landinum.

Mett verður, at um økið skal leggjast út til kommunurnar, so er tað ein fyritreyt, at hetta fyrisitingarliga verður lagt til ein felagskommunalan stovn at umsita. Hetta fyri at tryggja,

at fakligur serkunnleiki er til tilboðini og skipanirnar, umframt at hetta er neyðugt, fyri at raksturin kann gerast skynsamur.

Víst er á, at størsti fyrimunurin er, at umsitingarliga ábyrgdin bæði yvir borgarum og tilboðum er hjá einum og sama myndugleika, nevniliga kommununum. Eisini metir Kommunusamskipanin, at kommunurnar og kommunalu stovnarnir kunnu tryggja munandi betri gagnnýtslu og menning av fakligu førleikunum, ítøkiligu tænastunum og tilboðunum, eins og fíggingini, sum fyri stóran part kann skipast samhaldsfast millum kommunurnar. Um alt økið verður lagt til kommunurnar at umsita, koma kommunurnar at hava samanhangandi myndugleikaábyrgd av øllum børnum og ungum í aldrinum 0 – 18 ár. Hetta er av avgerandi týdningi, tí kommunurnar kunnu við hesum skipa tey fakligu heildartilboðini, sum bæði børnini og familjurnar hava tørv á. Føroya Kommunufelag leggur serligan dent á, at borganin hevur eitt ávíst stað at venda sær til, tá børn og ung hava ein ávísan tørv, ið krevur fakliga viðgerð. Hetta fyri at koma burtur úr verandi støðu, har tað ofta er ógreitt, hvør eigur at taka ábyrgd – og hvussu tey, sum eru kring barnið í felag kunnu finna fram til eina mennandi tilgongd fyri hvørt einstakt barn ella ungdóm.

Í sínum hoyringssvari vísir Kommunusamskipanin á, at umstøðurnar á økinum tykjast rættiliga óskipaðar. Skal økið børn og ung samskipast undir kommunalari ábyrgd, er neyðugt at ein arbeiðs- og tíðarleistur fyri, hvussu hetta skal fremjast í verki, verður gjørdur. Harafturat ynskir Kommunusamskipanin, at politiskar samráðingar byrja sum skjótast, soleiðis at semja verður staðfest viðvíkjandi politiska - og fíggjarliga ábyrgdarbýtinum ímillum land og kommunur á økinum.

Ásannast má, at fíggjarliga byrðan kann gerast lutfalsliga ójøvn fyri kommurnar, soleiðis sum kommunali bygnaðurin er í dag – eisini í mun til verandi barnaverndarsamstarvsøki, og kann hetta gerast ein avbjóðing. Tó hava kommunurnar í verki víst, at tær megna at raðfesta og lyfta tær uppgávur, sum verða lagdar til tær at umsita. Ein útlegging treytar, at neyðuga fíggingin fylgir við, umframt eina fíggarlig útjavningarskipan, til tess at tryggja sama tænastustøði kring alt landið.

### 10.1. Niðurstøða

Arbeiðsbólkurin er samdur um, at tað er av stórum týdningi, at tey, sum arbeiða við vælferðini og trivnaðinum hjá børnum, eiga at virka undir sama fyrisitingarliga myndugleika. Tá hesi fólk taka felags ábyrgd, verður lættari enn higartil at finna skynsamar loysnir fyri einstaka barnið. Arbeiðsbólkurin er sannførdur um, at sterkar fakligar eindir kring landið, í tali svarandi til uppskotið um kommunalar eindir frá 2009, fara at tryggja, at hetta mál verður rokkið.

Fyri kommunurnar verður nýggi bygnaðurin ein tilskundan at fara undir tættari samstarv, á sama hátt, sum væntað verður við øðrum útleggingum. Kommunurnar hava higartil víst, at tær loysa tær uppgávur, sum tær fáa litið upp í hendi – og tað fer óivað eisini at gera seg galdandi á økinum børn og ung. Talan er jú um borgarar, sum kommunurnar í sínum gerandisdegi hava tætt samband við, og sostatt eisini kenna tørvin hjá. Tí fara tær eisini at

vísa ábyrgd fyri, at tørvur teirra verður nøktaður, tá nýggju eindirnar eru skipaðar kring landið.

Stovnsøkið hevur ikki virkað nøktandi. Tað hevur ikki verið ført fyri at tillaga seg tørvin hjá barnaverndartænastunum, og í mun til børn og ung við breki hava alt ov fá tilboð verið til staðar. Við at samskipa stovnsøkið fæst betri samljóð millum tey, ið umsita stovnsøkið, og tey, ið skulu veita stovnstilboðini.

Ásannast má, at ein samskipan av trivnaðartilboðum og á viðgerðartilboðum til børn og ung hevur ligið á láni í eina drúgva tíð. Arbeiðsbólkurin mælir tí landsstýriskvinnuni til, at økið Børn og Ung í síni heild verður lagt til kommunurnar at umsita skjótast til ber, og at fíggjarligar umstøður verða fingnar til vega fyri hesum.

Yvirlit yvir bygnaðin er at finna í skjali 5.

## 11. Eftirlit

Tað er umráðandi, at veruligt eftirlit er við skipanum og tilboðum. Í viðmerkingunum til barnaverndarlógina varð víst á, at neyðugt var at seta fólk burturav til at hava eftirlit – hetta er tó ikki gjørt enn, so vítt arbeiðsbólkurin veit.

Neyðugt er við eftirliti, bæði við at kommunurnar yvirhalda ásetingarnar í lóggávuni og við virkseminum v.m. á tilboðunum og skipanunum. Arbeiðbólkurin vil tískil mæla til, at fólk verður sett, til burturav at fremja eftirlit. Hetta uttan mun til, um økið verður lagt út til kommunurnar ella ikki.

## 12. Visitatión til tilboð og skipanir

Vísandi til, at arbeiðsbólkurin mælir til, at økið verður lagt út til kommunurnar at umsita, eiga kommunurnar eisini at innskriva til tilboðini og skipanirnar, sí tilmæli undir **8.10.**, so at børn og ung við serligum tørvi altíð fáa rætta viðgerðartilboðið.

Mál um umsorgarnaryvirtøku skulu tó leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina, ið tekur avgerð. Hetta fyri at verja rættartrygdina hjá børnum og foreldrum.

Heildarætlanin frá greiningarmiðstøðini, sí **9.5.**,  er partur av innskrivingargrundarlagnum.

## 13. Fíggjarligt

Arbeiðsbólkurin metur, at sjálv flytingin av økinum til kommunurnar at umsita, í sær sjálvum ikki kemur at hava meirkostnað við sær, tí talan bert er um at flyta frá einum myndugleika til ein annan.

Harafturat verður mett, at heldur ikki eitt skipað tvørfakligt samstarv millum ymisku myndugleikarnar úti í kommunalu eindunum kemur at hava meirkostnað við sær. Talan er bert um at skipa tær ymisku tænastur og tilboð, sum eru til staðar í dag soleiðis, at tær verða gagnnýttar betri. Her verður serliga hugsað um kommunalu eindirnar, NSR og Gigni. Eru øki, har hesar tænastur og tilboð ikki eru til staðar í dag, vil tað hava ávísan meirkostnað við sær, at seta tær á stovn.

Í sambandi við stovnsetan av eini greiningarmiðstøð má roknast við, at hetta kemur at hava meirkostnað við sær, hóast talan í stóran mun er um at umskipa verandi útgreining. Verandi útgreining er ikki nøktandi. Tað er alneyðugt at raðfesta hetta økið, og har við skapa fíggjarligar karmar fyri, at útgreiningin kann koma at virka nøktandi.

Um nøktandi tilboð skulu verða til øll børn og ung, er neyðugt at útbyggja verandi tilboð og skipanir, og geva teimum hóskandi karmar at virka undir, bæði í mun til starvsfólk og høli. Tískil er neyðugt at seta pening av til endamálið, bæði innan almannaverkið, skúlaverkið og heilsuverkið.

Eisini er alneyðugt at skapa neyðugu fíggjarligu karmarnar fyri eftirliti við virkseminum innan økið.

Um økið verður lagt til kommunurnar at umsita, skal fígging fylgja við teimum uppgávum, sum verða lagdar út.

Niðanfyri verða útreiðslurnar í sambandi við øki Børn og ung seinastu árini víst. Talvan niðanfyri vísir útreiðslurnar í sambandi við umlætting á Dáanum, Frítíðarheiminum og Fjálgulon, umframt útreiðslurnar til búpláss til ung. Talan er um mett tøl fyri Búpláss, Dáan og Frítíðarheimið.




| | Ár 2006 | Ár 2007 | Ár 2008 | Ár 2009 |
|---|---|---|---|---|
| Búpláss | 2.000 | 2.000 | 2.200 | 2.050 |
| Dáin | 1.927 | 2.250 | 2.415 | 2.471 |
| Frítíðarheimið | 1.650 | 1.518 | 1.828 | 2.000 |
| Fjálgalon | 2.354 | 2.543 | 3.000 | 1.942 |

Talvan niðanfyri vísir útreiðslurnar til SFB, dagstovnin til fjølbrekað umframt samdøgurstilboðini.




| | Ár 2006 | Ár 2007 | Ár 2008 | Ár 2009 |
|---|---|---|---|---|
| SFB | 19.181 | 19.935 | 21.794 | 22.404 |
| Familjudepilin | 2.258 | 1.986 | 2.405 | 2.112 |
| Reiðrið | 2.050 | 2.342 | 2.431 | 2.410 |
| Samdøgursstovnur | 6.184 | 7.174 | 7.814 | 9.653 |
| Føroya Barnaheim | 7.222 | 7.943 | 8.663 | 5.978 |

Talvan niðanfyri vísir útreiðslurnar til stovnsuppihald uttanlands v.m. Barnaverndin fevnir um stovnsuppihald uttanlands, skipsverkætlan og ókeypis umboðan. § 16 forsorg fevnir um stovnsuppihald uttanlands[44] eftir forsorgarlógini. Talan er um mett tøl.




| | Ár 2006 | Ár 2007 | Ár 2008 | Ár 2009 |
|---|---|---|---|---|
| § 16 Forsorg | 388 | 539 | 1.749 | 5.627 |
| Barnavernd | 4.143 | 3.737 | 6.018 | 5.913 |

Hagtøl fyri útreiðalurnar hjá kommununum í sambandi við barnavernd fyriliggja bert fyri árini 2007 og 2009. Í 2007 vóru útreiðslurnar hjá kommununum uml. 34.500 tkr., meðan útreiðslurnar í 2009 vóru uml. 29.500 tkr.

[44] Eisini er einstøk útreiðsla eftir § 18 í forsorgarlógini tikin við.




## 14. Tilmæli

Mælt verður landsstýriskvinnuni til at:

1. tryggja, at tey tilboð, sum mælt verður til undir **8.5.**, **8.6.** og **8.7.** standa í boði,
2. tryggja, at tær skipanir, ið mælt verður til undir **8.3.** og **8.4.** framhaldandi eru virknar,
3. skipanirnar fáast at virka á einum so breiðum støði, ið mælt verður til í **9.**
4. Loysa gráøkis- og markamótstrupulleikar við at gjøgnumføra sektorábyrgdina á økinum,
5. Tilboð og skipanir, sum hava heimild í ávikavist forsorgarlógini og barnaverndarlógini verða umsitin av sama myndugleika.

Harafturat verður mælt landsstýriskvinnuni til at:

6. taka stig til, at greiningarmiðstøð verður sett á stovn,
7. lógaráseta tvørfakliga samstarvið innan økið Børn og Ung, eins og ábyrgdina hjá einstaka myndugleikanum at leggja tey tilmæli, sum greiningarmiðstøðin er komin fram til, til grund fyri fyriskipanum, ið verða settar í verk,
8. leggja Familjudepilin, samdøgursstovnarnar og Stuðulsfólkaskipanina fyri børn til ein felagskommunalan stovn at umsita,
9. seta óheft fólk til burturav at fremja eftirlit við økinum.

## 15. Lógarbroytingar og onnur verkseting

Um økið verður flutt til kommunurnar, mugu kommunurnar fáa heimildirnar at stovna og skipa øll stovnstilboð, eins og tænastur annars. Hetta krevur, at lógarbroytingar verða gjørdar bæði í forsorgarlógini og í barnaverndarlógini, her í millum at:

- tillaga §§ 16 og 32 c í forsorgarlógini,
- tillaga § 33 í barnaverndarlógini,
- tillaga § 35 í barnaverndarlógini, soleiðis at ein visitatiónsskipan kemur at virka innan henda lógarkarm,
- at tað í § 27 í barnaverndarlógini verður ásett, at fólk fáa grundleggjandi førleikar, áðrenn tey gerast fosturforeldur
- umhugsa støddina á samstarvsøkjum, ið eru ásett í § 4 í barnaverndarlógini, í samsvari við álitið um kommunalar eindir frá 2009
- broyta viðkomandi ásetingar í sambandi við, at økið verður umskipað og lagt til kommunurnar

Harafturat skulu markamót ásetast, soleiðis at ábyrgdarbýtið millum myndugleikarnar gerst greitt. Hetta arbeiðið skal gerast í samstarvi við avvarðandi myndugleikar, soleiðis at tryggjað verður, at eingin fer niður ímillum skipanirnar.

Reglur skulu ásetast í sambandi við, at greiningarmiðstøð verður skipað.

Eisini er neyðugt at gera mannagongdir fyri samskifti og samstarvi millum myndugleikarnar.

Nærri reglur  um eftirlit muga eisini ásetast.

Arbeiðsbólkurin mælir at enda til, at Almannaráðið fer undir samráðingar við avvarðandi partar innan heilsuverkið og skúlaverkið um tann partin av tilmæli okkara, ið viðvíkur teirra yrkisøki.

Tórshavn, tann 12. mars 2010

| | |
|---|---|
| Oddbjørg Balle, leiðari<br>Barnaverndarstova Føroya | Minna Poulsen, leiðari<br>Børn og ung |
| Eyðun Jensen, leiðari<br>Barnaverndartænastan í Tórshavn | Súsanna Holm, leiðari<br>Stuðulsfólkaskipanin fyri børn |
| Jákup Foldbo, leiðari Eysturoyar<br>Barnaverndartænasta | Birita Viderø, fulltrúi<br>Almannastovan |
| Hans Andreas Dam Joensen, leiðari<br>Barnaverndartænastan í Sundalagnum | Tórhild Højgaard, fulltrúi<br>Almannamálaráðið |

## Skjal 1: Bygnaður 2006 til 2009



## Skjal 2: Bygnaður í 2009



## Skjal 3: Bygnaður síðan september 2009



# Skjal 4: Yvirlit yvir tilboð og skipanir umframt ábyrgdarbýtið

| Kommunurnar | | | Landið | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | AMR | | | | | | | MMR | | HMR | | |
| | **Hvør einstøk kommuna** | **Fostur-foreldra-skipanin** | **Stovnur fyri B&U** | **Føroya Barnaheim** | **Serdag stovnur** | **Familju-depilin** | **SFB Reiðrið** | **SFB Stuðlar** | **Nærverkið** | **SND** | **NSR** | **Psyk. depilin** | **Blákross ambulant** | **LS KS SS** |
| **Ráðgeving v/sálarfrøðingi** | | | | | | xx | | | | xx | xx | xx | | |
| **Eygleiðing** | | | | | | xx | | | | xx | | | | |
| **Sjúkuavgerð** | | | | | | | | | | | | xx | | |
| **Útgreining** | | | | | | | | | | xx | | | xx | |
| **Frítíðartilboð/** | xx | | | | | | | xx | | | | | | |
| **Dagstovn** | xx | | | | xx | | xx | | | | | | | |
| **Venjing – fys.** | | | | | | | xx | xx | | | | | | xx |
| **Búpláss – trupul** | | | xx | | | | | | xx | | | | | |
| **Búpláss – lættari** | | xx | | xx | | | | | xx | | | | | |
| **Búpláss – fam.** | | | | | | xx | | | | | | | | |
| **Sosialped. viðgerð** | | | xx | xx | xx | xx | xx | | | | | | | |
| **Heilsu viðgerð/røkt** | | | | | | | | xx | | | | xx | | xx |
| **Rúsevnisviðgerð** | | | | | | | | | | | | | xx | |
| **Umlætting** | | xx | | | | | xx | xx | xx | | | | | |
| **Útslúsing** | | | | | | | | | | | | | | |
| **Búvenjing** | | | | | | | | | | xx | | | | |

## Skjal 5: Framtíðar bygnaður

